februar 2021

BYGGISKRÁ

Heildararbeiðstøka

5432 // Skrivstovubygningur til Sjóvinnustýrið á Giljanesi

LANDSVERK

INDHOLD

1. Innleiðing 4

1.1. Verkevni 4

1.2. Byggiánari og byggiharri 5

1.2.1. Skipan undir skriving av byggiskrá 6

1.2.2. Skipan undir prosjektering og bygging 6

1.2.3. Arbeiðsgrundarlag 6

1.2.4. Útbjóðingarháttur 7

1.2.5. Kappingartreytir 7

1.2.6. Myndugleikakrøv 7

2. Krøv og ynskir til byggimálið 7

2.1. Myndugleikar 7

2.2. Burðardygd 7

3. Byggipláss 8

3.1. Veðurlag 8

3.2. Veitingar 8

3.3. Lendisviðurskifti 8

3.4. Handan og avhending av byggiplássi 8

3.5. Byggiplássinnrætting 8

3.5.1. Fyrstuhjálparkassi og eldsløkkjari 9

3.6. Ferðsluumráðir á byggiplássinum 9

3.6.1. Uttandura ferðsluumráðir 9

3.6.2. Innandura ferðsluumráðir 9

3.7. Heilsa, Trygd og Umhvørvi (HTU) 9

4. Inniumhvørvið 11

4.1. Ljóðviðurskifti 11

4.2. Skipan av innrætting 11

4.2.1. Fólk við rørslutarni 11

4.2.2. Skrivstovudeild 11

4.2.3. Stjórn 11

4.2.4. Skipaskráseting: Lógar- og manningardeildin 12

4.2.5. Sýnsdeildin 12

4.2.6. Umsiting og móttøka 12

4.2.7. Felagsdeild, nær 13

4.2.8. Felagsdeild, fjar 13

4.2.9. Gongdir 15

5. Skipan av byggiøkinum 16

5.1. Økið uttanum 16

5.2. Atkomuvegur 16

5.3. Parkeringspláss, atgongd, gøtur, terrassur o.l. 16

6. Innleggingar 17

6.1. Alment um veitingar (til bygningin) 17

6.2. Kloakkskipan í lendi 17

6.3. HVS installatiónir 18
6.3.1. Alment 18
6.3.2. Sanitet 20
6.3.3. Leiðingar innandura 20
6.3.4. Brandskáp 20
6.3.5. Vesi 20
6.3.6. Vøsk 20
6.3.7. Skiftingarrúm 21
6.3.8. Gólvfrárenning 21
6.3.9. Onnur sanitetsútgerð 21

6.4. Ventilatión 21

6.5. CTS skipan 22

7. El-arbeiði 23

7.1. Almennar ávísingar viðvíkjandi el-arbeiðum 23

7.2. Tilfar 24

7.3. Talvur 24

7.4. Stikkleiðing 25

7.5. Jørðingsskipan 25
7.5.1. Jørðjavning 25

7.6. Kaðalføringsvegir 25

7.7. Bruna- og ljóðtettingar 26

7.8. Ljósinnleggingar 26

7.9. Kraftinnleggingar 26
7.9.1. Kraftinnleggingar til HVS- og ventilatiónsskipanir 27

7.10. Dátukervi 27

7.11. Lyklaskipan 28

7.12. Sjálvvirkandi brunaávaringarskipan (ABA) 28
7.12.1. Sjálvvirkandi hurðaafturlatingarskipan (ABDL) 28

8. Krøv og ynski til bygningslutir 29

8.1. Konstruktiónir 29

8.2. Lastir og deformatiónir 30
8.2.1. Vindlastir 30
8.2.2. Kavalastir 30
8.2.3. Jørðtrýst 30
8.2.4. Deformatiónir 30

8.3. Framsíður 30

8.4. Tekja 30
8.5. Vindeygu og størri glasumráðir 31
8.6. Avskerming 31
8.7. Skilaveggir 31
8.8. Gólv 31
8.9. Loft 31
8.10. Út- og innhurðar 32
8.11. Vátrúm 32

9. Bjálvingarkrøv o.l. byggiteknisk krøv 32
9.1. Tættleiki 32
9.2. Orkurammuútrokning 32

10. Innbúgv og útbúnaður 33

11. Prosjekttilfar 35
11.1. Prosjekttilfar at lata inn við tilboðnum 35
11.2. Prosjektering og prosjekttilfar 35
11.3. Krøv til prosjektorganisatión tilboðsgevarans 35
11.4. Gransking og góðskutrygging 36
11.5. Tíðarætlan 36
11.5.1. Tíðarætlan 36
11.5.2. Ónýtisdagar (spilldagar) í tíðarætlanina 36
11.5.3. Krøv til gjaldstreytir/gjaldsætlan 37
11.6. Prístalsregulering 37
11.7. Meir- og minniveitingar 38
11.8. Dagbøtur fyri prosjektering 38
11.9. Dagbøtur fyri byggiarbeiðið 38
11.10. ABT93 39

12. Fíggjarlig viðurskifti 39

13. Rakstur Og Viðlíkahald (ROV) 39
13.1. Prosjektering (ROV) 39
13.2. Gransking (ROV) 40
13.3. Avhending (ROV) 40

1. INNLEIÐING

Henda byggiskrá umrøðir bygging av einum nýggjum skrivstovubygningi til Sjóvinnustýrið.

Bygningurin skal byggjast á matr. nr. 319h í Vága kommunu, og fevnir tað um bæði bygning og atkomu umframt parkeringsøki og økið uttanum.

Byggjast skal ein skrivstovubygningur á umleið 800 m² brutto. Bygningurin skal geva til kennar, at her húsast ein stovnur, ið arbeiðir við maritimum málum. Bygningurin er býttur sundur í fýra ymiskar deildir, og skulu einstøku deildirnar ikki órógva hvørja aðra, men heldur styðja upp undir virksemið á hvørjari einstakari deild.

Alt byggiøkið skal hugsast inn í verkætlanina. Staðseting av atkomu og parkeringarøki skal loysast á skynsaman hátt, so vitjandi og starvsfólk lætt kunnu koma til og frá bygninginum. Týdningarmikið er, at atkoma inn í bygningin er væl vard fyri vindi og regni. Samlaða byggiøkið er á leið 1.480 m².

Tilboðið skal vera íroknað allar heildararbeiðstakaraútreiðslur í sambandi við útinnan av byggiverkætlanini til fult virkisføran bygning, íroknað handverkaraútreiðslur, innbúgv sambært innbúgvslista, heildararbeiðstakara ráðgevarasamsýning (íroknað tillaging, verkætlanar- og byggileiðslu og fakeftirlit), byggiplássinnrætting og byggiplássrakstur íroknað vetrararbeiðir.

Heildararbeiðstakarin skal rokna allar sínar útreiðslur upp í tilboðið, íroknað ráðgevarasamsýning til møguliga tillaging av verkætlanini í samstarvi við brúkarar og byggiharran. Hetta er galdandi fyri allar veitingar, eisini tekningar, útrokningar og fundarvirksemi.

Somuleiðis skal alt lendisarbeiðið roknast upp í tilboðið sum til dømis sandur, grevstur, jørð o.s.fr. Heildararbeiðstakarin skal í seinasta lagi 14 dagar eftir váttan av sáttmála senda endaligan tilfarslista til byggiharra, sum skal góðkenna sáttmálan í seinasta lagi 14 dagar eftir móttøku. Góðkenning er treytað av, at tilfar lúkar krøv í útboðstilfarinum."

1.1. Verkevni

Landsstýrismaðurin hevur tikið avgerð um at seta eina bólk, mannaður við starvsfólkum úr Sjóvinnu-stýrinum og Landsverk, at koma við einum tilmæli um bygging av einum nýggjum skrivstovubygnini til Sjóvinnustýrið.

Heitt verður á bólkin um at lata úr hondum eitt tilmæli, sum tekur fyrilit fyri eini bygging av skrivstovubygningi, ið lýkur tann tørv, ið Sjóvinnustýrið hevur í dag.

Bólkurin hevur viðgjørt arbeiðssetningin og er komin til tað niðurstøðu, at verkætlanin skal fevna um ein skrivstovubygning á Giljanesi í Vága kommunu, ið er deildur sundur í fýra deildir.

- Skrivstovudeild
- Felagsdeild, nær
- Felagsdeild, fjar
- Høvuðsinngongd

Meiri nágreinilig krøv og ynskir frá arbeiðsbólkinum eru lýst seinni í hesi byggiskrá.

1.2. Byggiánari og byggiharri

Byggiánari:

Umhvørvis- og vinnumálaráðið
Gongin 7
FO-110 Tórshavn
uvmr@uvmr.fo

Byggiharri/ráðgevi:

Landsverk
Tinghúsvegur 5
FO-110 Tórshavn
lv@lv.fo

Arbeiðsbólkur:

Hans Johannes á Brúgv, Formaður
Sjóvinnustýrið - Stjóri
hansj@fma.fo

Hanus Mikkelsen, Sjóvinnustýrið
Deildarleiðari
hanusm@fma.fo

Jákup Kristian Poulsen
Sjóvinnustýrið – Ráðgevi
jakupp@fma.fo

Gunnvá á Lofti
Sjóvinnustýrið – Deildarleiðari
gunnval@fma.fo

Christel Christophersen
Sjóvinnustýrið – Deildarleiðari
kirstinj@fma.fo


Gunnleyg Árnafjall
Umhvørvis- og vinnumálaráðið
gunnleyga@uvmr.fo

Verkætlanarleiðari:


Rói H. Lamhauge
Landsverk
rola@lv.foSkipan av byggimáli

1.2.1. Skipan undir skriving av byggiskrá

Arbeiðið at skriva byggiskránna hevur verið skipað soleiðis:



1.2.2. Skipan undir prosjektering og bygging



1.2.3. Arbeiðsgrundarlag

Arbeiðið verður at gera samsvarandi:

- BK17 (bygningskunngerðin 2017)
- BR18 – Lydforhold (§ 368 - §376) umframt tilhoyrandi vegleiðing pkt. 5.0 til pkt. 5.4
- Almennu byggisamtyktini fyri Vága kommunu
- Lýstum lógum, samtyktum og reglugerðum, ið kunnu gerast galdandi fyri útbodna arbeiðið, t.d. viðvíkjandi brunatrygd, arbeiðsumhvørvi o.ø.
- Almennum ávísingum viðvíkjandi el-arbeiðum (sí pkt. 7.1)
- Ávísingum frá teimum einstøku byggiharra eftirlitinum (sí pkt.11.4)
- IKT-avtala

1.2.4. Útbjóðingarháttur

Verkætlanin verður boðin út og verður sett í verk, um neyðug játtan verður tøk.

Verkætlanin verður boðin út í heildararbeiðstøku smbr. útbjóðingarskrivi frá Landsverki.
Arbeiðstakari hevur ábyrgd av millum annað ráðgeving, øllum arbeiðstøkum, stýring og leiðslu, umframt góðskustýring og Heilsu, trygd og umhvørvi.

1.2.5. Kappingartreytir

Viðvíkjandi lýsing av kappingartreytum verður víst til útbjóðingarbrævið.

1.2.6. Myndugleikakrøv

Byggingin skal fylgja almennu byggisamtyktini BK17 umframt kommunalu byggisamtyktini fyri økið.
Aðrir viðkomandi faknormar og vegleiðingar fyri ávísu byggingina skulu somuleiðis fylgjast.

Tað er ábyrgdin hjá heildararbeiðstakaranum at syrgja fyri, at øll viðurskiftir verða avgreidd viðvíkjandi byggiloyvinum. Í hesum sambandi skulu viðurskiftir við brunamyndugleikar, arbeiðseftirlitið, SEV, Heilsufrøðiligu starvsstovuna, friðingarmyndugleikar o.o., ið kunnu hava ásetingar viðvíkjandi byggimálinum, eisini avgreiðast.

2. KRØV OG YNSKIR TIL BYGGIMÁLIÐ

2.1. Myndugleikar

Sjóvinnustýrið ynskir ein skrivstovubygning á uml. 800 m² bruttovídd.

Bygningurin skal staðsetast og háttast soleiðis á byggiøki, at útbyggingarmøguleikar eru, sí fylgisskjal 01

Høvuðsinngongdin til bygningin skal vera sjónlig og innbjóðandi, og gott pláss skal vera til bilbásar við høvuðsinngongdina. Útsjónd og snið á bygninginum, innan og uttan, skulu passa til umhvørvið og kunnu hava ein maritiman dám. Bygningur skal passa til veðurviðurskiftini á staðnum og verja inngongd fyri vindi og regni.

Heildararbeiðstakarin hevur ábyrgd av at fáa til vegar neyðug loyvir, herundir byggiloyvið frá Vága kommunu.

2.2. Burðardygd

Skrivstovubygningurin skal byggjast og rekast soleiðis, at hugsað verður burðardygt. Bygningurin skal upphitast við eini hitapumpuloysn sum til dømis luft-til-vatn-skipan ella jarðhitaskipan. Tilfarsvalið annars skal á besta hátt vera orkuvinarligt og burðardygt og skal í størstan mun leingja um livitíðina á bygninginum. Sí pkt. 8 og 9, sum lýsa serstøk krøv til bygningslutir

3. Byggiplass

Byggiøkið er á matr. nr. 319h á Giljanesi í Vága kommunu. Samlaða víddin er á leið 1.480 m². Nettonýtslustigið er 0,5, men frávik kann gerast á økinum, so nettonýtslustigið verður 0,8.



3.1. Veðurlag

Heildararbeistakarin skal seta seg væl inn í veðurviðurskiftini á staðnum og skal staðseta atkomu, bygning, útiøki v.m. á besta hátt í mun til veður og vind.

3.2. Veitingar

Víst verður til Vága kommunu í sambandi við verandi tøkniligar veitingar, vatn, kloakk og frárensl í økinum. Heildararbeiðstakari skal íbinda allar leiðingar í kommunalar leiðingar.

3.3. Lendisviðurskifti

Lendið er veltur bøur. Byggilinjan skal altíð haldast 20 m frá miðlinju á landsvegi omanfyri.

Byggiharrin væntar, at heildararbeiðstakarin nemur sær kunnleika um verandi viðurskiftini á byggiøkinum, áðrenn tilboð verður latið.

3.4. Handan og avhending av byggiplássi

Heildararbeiðstakarin hevur ábyrgd av at boða Vága kommunu og Arbeiðseftirlitinum frá, áðrenn byggiplássið verður riggað til.

3.5. Byggiplássinnrætting

Bygningurin verður boðin út sum heildararbeiðstøka, og tí skal heildararbeiðstakarin rokna allar veitingar upp í viðvíkjandi tilbúgving, rakstri og avtøku av byggiplássi við í sínum tilboði. Harumframt skal heildararbeiðstakarin leggja eina byggiplásstekning við í tilboðið. Byggiplásstekningin skal vera í stødd 1:200.

Byggiharrin rindar fyri byggistreym.

Byggiplássið skal stikast við byggiplásshegni.Tað er ábyrgdin hjá heildararbeiðstakaranum at veita, uppstilla, viðlíkahalda og burturbeina byggiplásshegnið.

Tað er ábyrgdin hjá heildararbeiðstakaranum at tryggja byggiplássið móti stuldri og um neyðugt skipa fyri vaktarskipan.

Heildararbeiðstakarin hevur ábyrgd av at veita og uppseta skeltir á felagsgonguleiðum og í arbeiðsøkjum, áðrenn arbeiðið byrjar, umframt at viðlíkahalda hesi og burturbeinta tey, tá ið arbeiðið er liðugt.

Heildararbeiðstakarin hevur ábyrgd av at framleiða felagsskelti, som vísur navn á prosjektinum og eina tekning av byggingini umframt navn á byggiharra, teknikarum og arbeiðstakara

Heildararbeiðstakarin hevur ábyrgd av, at omanfyrinevnda skeltið verður framleitt og uppsett, soleiðis tað er mótstøðuført ímóti veðrinum á Giljanesi.

3.5.1. Fyrstuhjálparkassi og eldsløkkjari

Heildararbeiðstakarin skal veita fyrstuhjálparkassar við eygnaskoli og brandsløkkjarar í nóg stórum tali.

Heildararbeiðstakarin hevur ábyrgd av, at fyrstuhjálparkassarnir og brandsløkkjararnir verða viðlíkahildnir og dagførdir gjøgnum alla byggitíðina.

3.6. Ferðsluumráðir á byggiplássinum

3.6.1. Uttandura ferðsluumráðir

Heildararbeiðstakarin ger, viðlíkaheldur, veðurtryggjar, umskipar og burturbeinir byggiplássvegir, gonguvegir og yvirumkoyringar á byggiplássinum.

3.6.2. Innandura ferðsluumráðir

Heildararbeiðstakarin veitir, uppsetir, viðlíkaheldur, flytur, niðurtekur og burturbeinir byggiplásstrappur og byggiplássgongubrúgvar.

3.7. Heilsa, Trygd og Umhvørvi (HTU)

HTU skal vera ein týðandi partur av verkætlanini í prosjektering, útinning, rakstri og viðlíkahaldi, og starvsfólk skulu hava eitt gott arbeiðsumhvørvi bæði í tilgongdini til verkætlanina, undir bygging, og tá bygningurin er tikin í nýtslu.

Skyldur javnførdar ásetingunum í arbeiðsumhvørvislóggávuni og umhvørvislóggávuni skulu fylgjast. Tryggjast skal, at ásetingarnar í "*Arbejdsministeriets bekendtgørelse nr. 1017 af 15. december 1993 om indretning af byggepladser og lignende arbejdssteder efter lov om arbejdsmiljø*", ið er sett í gildi fyri Føroyar við "*kunngerð nr. 136 frá 4. september 1995 um reglur fyri byggipláss og líknandi arbeiðspláss*" við fylgiskjølum, verða fylgdar. Listi yvir loysnir innan arbeiðsumhvørvisviðurskifti, sum eru út yvir tað vanliga, skal gerast.

Heildararbeiðstakarin skal longu undir prosjektering taka hædd fyri HTU. Heildararbeiðstakarin skal seta ein HTU-samskipara, sum undir prosjektering hevur ábyrgd av at meta um og fyrireika eitt trygt byggiplass undir bygging. Harumframt skal HTU-samskiparin hugsa HTU inn í framtíðar umvælingar -og viðlíkahaldsarbeiði.

Heildararbeiðstakari skal longu í prosjektering tryggja, at byggiarbeiðið í mest møguligan mun verður framt í vanligari arbeiðstíð, tó kann henda, at neyðugt verður at skipa nakað av byggiarbeiðinum uttan fyri vanliga arbeiðstíð. Skipað samstarv skal vera millum byggifeløg, byggileiðslu, fakeftirlitið og starvsfólk, herundir byggifundir, ið sum meginregla verða hildnir hvørja ella aðruhvørja viku. Trygdarrunda og fundir verða sum meginregla hildin 14. hvønn dag.

Heildararbeiðstakarin skal brúka *"Håndbogen - arbejdsmiljø i bygge og anlæg"* frá 2020 sum grundarlag fyri byggiplássinnrættingini.

Møguligar vanlukkur ella nær-við-vanlukkur skulu skrásetast í Dalux Field.

Tryggjast skal, at byggiarbeiðið verður lagt soleiðis til rættis, at tað sum heild verður til minst møguligan ampa fyri kringumstøðurnar. Arbeiðið skal skipast soleiðis, at tað elvir til minst møguligt óljóð, dálking og ferðslu í umhvørvinum. Fyribils ávísingar- og vegleiðandi skelti skulu setast upp í samstarvi við byggiharran og Vága kommunu.

HTU-ætlanin hjá Landsverki skal fylgjast. Sí fylgiskjal 1-9_HTU-ætlan. Tilfar og upplýsingar til HTU-ætlanina frá heildararbeiðstakara skulu latast tí, sum vegna byggiharra er HTU-samskipari (trygdar-/arbeiðsumhvørvissamskipari).HTU tilfar kann altíð finnast á heimasíðuni hjá Landsverki, undir oyðubløð.

4. INNIUMHVØRVIÐ

Skipanir skulu tryggja, at hitin í skrivstovum, fundarhølum o.ø. rúmum er hóskandi til virkisøkið í bygninginum, og at stýringin kann gerast skynsamt. Krav verður sett til, at gólvhiti er í øllum gólvum, og at eingin radiatorur er í bygninginum.

Luftskiftisskipanir skulu tryggja góðskuna á inniluftini smbr. galdandi ásetingunum. Fyrilit skal havast fyri, at skipanirnar eru einfaldar at stýra bæði í mun til orku og virkisøki.

Val av tilfari skal tryggja, at góð luftgóðska er í rúmunum – tilfar skal í minst møguligan mun lata partiklar/damp frá sær. Allar vørur og byggitilfar skulu vera CE merktar (Conformité Européenne)

Dentur skal leggjast á at fáa dagsljós inn í øll rúm, har krav er um tað. Virksemið í ymsum rúmum má ikki avmarkast vegna blendandi dagsljós. Sólavskerming skal setast upp, har tað er neyðugt.

4.1. Ljóðviðurskifti

Bygningurin skal staðsetast soleiðis á byggiøkið, at óljóð frá bilum o.l. verður avskermað og á ongan hátt órógvar inni í bygninginum. Somuleiðis skulu parkeringsviðurskiftini inni á byggiøkinum staðsetast soleiðis, at heldur ikki hesi geva óljóð frá sær inn í bygningin.

Ljóðkrøv til bygningin skulu fylgja ásetingunum í bygningskunngerðini BK17.

4.2. Skipan av innrætting

4.2.1. Fólk við rørslutarni

Skrivstovubygningurin skal skipast soleiðis, at fólk við rørslutarni lættliga kunnu flyta seg runt í øllum bygninginum. Kravið er eisini galdandi fyri atkomu til bygningin. Víst verður til bygningskunngerðina BK17.

4.2.2. Skrivstovudeild

Skrivstovudeild skal innrættast til fylgjandi deildir:

1. Stjórn
2. Skráseting, lógar- og manningardeildin
3. Sýnsdeildin
4. Umsiting og móttøka
5. Felagsdeild, nær
6. Felagsdeild, fjar
7. Gongdir

Skrivstovur skulu hava gott visuelt samband, annaðhvørt út móti felagsrúmum ella millum skrivstovur, sí pkt. 8.7.

Skrivstovur skulu vera útbúnar við net- og el-stikkum fram til skrivborð, sí pkt. 7.9.
Skrivstovur í einstøku deildunum skulu liggja lið um lið.

4.2.3. Stjórn

Ein skrivstova á 17 m2 nettovídd.

Skrivstova skal vera rætthyrnt. Rúmið skal kunna innrættast, so arbeiðsfólk hevur gott yvirlit yvir alt rúmið, og at hetta er væl innrættað – sí pkt. innbúgv.

Skrivstova á 10 m2 nettovídd.
Skrivstova skal vera rætthyrnt. Rúmið skal kunna innrættast, so arbeiðsfólk hevur gott yvirlit yvir alt rúmið, og at hetta er væl innrættað – sí pkt. innbúgv. Tað skal bera til at deila skrivstovuna sundur í tvær eins stórar einstaklingaskrivstovur.

4.2.4. Skipaskráseting: Lógar- og manningardeildin

Tvær skrivstovur á 17 m2 nettovídd.
Skrivstova skal vera rætthyrnt. Rúmið skal kunna innrættast, so arbeiðsfólk hevur gott yvirlit yvir alt rúmið, og at hetta er væl innrættað – sí pkt. innbúgv. Tað skal bera til at deila skrivstovuna sundur í tveir eins stórar einstaklingaskrivstovur.

Átta skrivstovur á 10 m2 nettovídd.
Skrivstova skal vera rætthyrnt. Rúmið skal kunna innrættast, so arbeiðsfólk hevur gott yvirlit yvir alt rúmið, og at hetta er væl innrættað – sí pkt. innbúgv.

4.2.5. Sýnsdeildin

Ein skrivstova á 17 m2 nettovídd.
Skrivstova skal vera rætthyrnt. Rúmið skal kunna innrættast, so arbeiðsfólk hevur gott yvirlit yvir alt rúmið, og at hetta er væl innrættað – sí pkt. innbúgv. Tað skal bera til at deila skrivstovuna sundur í tveir eins stórar einstaklingaskrivstovur. Tað skal eisini bera til at brúka skrivstovuna sum ad hoc fundarhølið/morgunfund.

Opið skrivstovulandslag á 80 m2 nettovídd.
Skrivstovulandslagið skal húsa átta arbeiðstøðum og skal innrættast soleiðis, at brúkarin í framtíðini lættliga kann umskipa skrivstovulandslangið til fleiri einstaklingaskrivstovur.

4.2.6. Umsiting og móttøka

Allar skrivstovur hjá umsiting skulu liggja lið um lið. Ynski er, at tað er atgongd frá skrivstovu á 17 m² til skrivstovu á 17 m² (sum samstundis er móttøka), og at umsiting liggur við høvuðsinngongdina, so at viðskiftafólk síggja móttøkuna, tá tey koma inn. Móttøkan er ikki ein 'traditionell' móttøka, men heldur ein vanlig skrivstova, ið er sjónlig. Pláss skal gerast á veggin beint við móttøkuna, har MÓTTØKA stendur við stórum bókstavum soleiðis, at viðskiftafólk síggja, hvar hendan er, og hvar tey skulu fara.

Ein skrivstova á 17 m² nettovídd
Skrivstova skal vera rætthyrnt. Rúmið skal kunna innrættast, so arbeiðsfólk hevur gott yvirlit yvir alt rúmið, og at hetta er væl innrættað – sí pkt. innbúgv. Tað skal bera til at deila skrivstovuna sundur í tveir eins stórar einstaklingaskrivstovur.

Ein skrivstova á 17 m² nettovídd (sum samstundis er móttøka)
Skrivstova skal vera rætthyrnt. Rúmið skal kunna innrættast, so arbeiðsfólk hevur gott yvirlit yvir alt rúmið, og at hetta er væl innrættað, m.a. skal vera pláss fyri tveimum skrivstovuborðum – sí pkt. innbúgv. Tað skal bera til at deila skrivstovuna sundur í tveir eins stórar einstaklingaskrivstovur.

Ein skrivstova á 10 m² nettovídd
Skrivstova skal vera rætthyrnt. Rúmið skal kunna innrættast, so arbeiðsfólk hevur gott yvirlit yvir alt rúmið, og at hetta er væl innrættað – sí pkt. innbúgv.

4.2.7. Felagsdeild, nær

Øll rúm í deildini skulu liggja beint við skrivstovudeildina. Har ynski er um beinleiðis atgongd millum rúm, verður hetta lýst nærri niðanfyri.

Printrúm
Stødd umleið 12 m2 nettovídd.
Rúmið skal hava net- og el-stikk til útgerð eins og skrivstovur, sí pkt. 7.9. Stikk skulu staðsetast í mun til innbúgv og útgerð. Rúmið skal staðsetast beint við móttøkuna og tó soleiðis, at onnur starvsfólk, sum brúka printrúmið, ikki órógva starvsfólkini í móttøkuni.

Fundarrúm
2 fundarrúm á 12 m2 nettovídd.
Rúmið skal hava 4 net-stikk og 8 el-stikk, staðsett í mun til innbúgv og útgerð. Tað skal bera til at heingja skerm á vegg. Ynski er, at rúmið hevur glasrút ella -vegg út móti felagsdeild.

Fundarhøli
Stødd umleið 35 m2 nettovídd.
Fundarrúm skal rúma einum longum borði og stólum til 25 fólk. Rúmið skal hava net- og el-stikk. Tað skal bera til at heingja skerm á vegg. Ynski er, at rúmið hevur glasrút ella -vegg út móti felagsdeild.
Fundarhøli skal verða útgjørt við 12 stk. el-stikk og 6 stk. net-stikk , staðsett í mun til innbúgv og útgerð.
Heildararbeiðstakarin skal rokna 2 stk. gólvboksir upp í við 2 el-stikkum og 2 net-stikkum.
Fundarhøli skal liggja tætt upp at høvuðsinngongdini soleiðis, at tað ikki er neyðugt at ganga ígjøgnum allan bygningin fyri at koma til fundarhølið.

Vesir
Tvey vesi til kvinnur á minst 4 m2 nettovídd. Tað eina vesið skal verða gjørt smbr. krøvum í BK17 til vesir til rørslutarnað.
Tvey vesi til menn á minst 4 m2 nettovídd. Tað eina vesið skal verða gjørt smbr. krøvum í BK17 til vesir til rørslutarnað.
Vesini skulu verða lukkað rúm og ikki hava opu í erva ella neðra.

4.2.8. Felagsdeild, fjar

Øll rúm í deildini kunnu liggja longri burtur frá skrivstovudeildini enn Felagsdeild, nær. Har ynski er um beinleiðis atgongd millum rúm, verður hetta lýst nærri niðanfyri.

Matarhøli og køkur
Stødd umleið 35 m2 nettovídd.
Matarhøli og køkur skulu vera í saman rúmi. Køkurin er ætlaður til, at starvsfólk kunnu sjálvi gera sær heitan mat. Køkur skal innrættast við køkseindum á í minsta lagi 5 stk. á 60 cm breið undirskáp umframt borðplátu, sum er slitsterk og løtt at halda. Køkurin skal í minsta lagi hava køksvask og krana,

uppvaskimaskinu, køliskáp, kókiplátur og eymhettu. El-stikk skulu vera til kaffimaskinu, el-tól o.l. yvir borðplátu, í minsta lagi 8 stk. deildar á 4 gruppur, umframt allar fastar innleggingar sum til dømis eymhetta, køliskáp og uppvaskimaskina.
Køkurin skal vera hvítur og slitsterkur – borðplátan skal vera myrk, slitsterk og løtt at halda.
Matarhøli skal rúma í minsta lagi borð og stólar til 25 fólk. Ynski er, at matarhøli er ljóst og hevur gott útsýni.

Skjalasavn
Støddumleið 62 m2 nettovídd.
Skjalasavn skal bæði rúma eldri skjøl, sum stovnurin liggur inni við í dag, umframt framtíðar skjøl, sum fyrisitingarlógin áleggur stovninum at savngoyma. Skjalasavnið skal innrættast við reolum á skinnarum, so rúmið skal tola tyngd frá slíkari goymslu. Nyttulast á gólv í arkiv skal dimensjonerast eftir lastflokki E smbr. DS/EN 1991-1-1.

Skiftirúm kvinnur/menn
Stødd 8 m2 nettovídd.
Skiftirúmið skal innrættast við felagsskiftirúmi til kvinnur og menn og við einum tilhoyrandi brúsurúmi, sum kann læsast av. Skiftirúmið skal innrættast við beinkjum og skápum (lockers) til 10 fólk. 1 stk. el-stikk skal vera til hárturkarar o.l. tól. Brúsurúmið skal innrættast við beinki, knakum til turr klæðir og einari brúsu.

Reingerðarrúm og goymsla
Stødd umleið 9 m2 nettovídd.
Reingerðarrúm skal innrættast við reingerðarvaski og krana, vaskimaskinu, turkitrumlu, borðplátu, sum er slitsterk, tolir vætu og er løtt at halda, og hillum til sápugoymslu, vesipappír v.m. Pláss skal vera fyri reingerðarvogni og dustsúgvara.
Vaskimaskina og turkitrumla er til lættari brúk, lappar, handklæðir o.a.
Reingerðarrúm skal vera útgjørt við 2 stk. el-stikkum yvir borðplátu umframt el-stikk til vaskimaskinu og turkitrumlu.

Tøknirúm og servararúm
Meting umleið 15 m2 nettovídd.
Tøknirúm skal staðsetast soleiðis, at hetta á ongan hátt órógvar skrivstovudeildina. Støddin á rúminum er tengt at útgerðini og krav um atkomu til tøkniligu skipanirnar.

Eisini skal bygningurin hava eitt servararúm. Í servararúminum skal vera pláss fyri einum 19" rakki, har møguleiki er fyri at hava tænastueftirlit frá øllum fýra síðunum. Servararúmið skal undir øllum umstøðum vera turt, og tí skulu ongar aðrar vatninnleggingar/-rør ganga gjøgnum servararúmið.

Goymsla
Stødd umleið 10 m2 nettovídd.
Goymsla skal vera upphitað rúm til goymslu av ymsum tólum, bildekkum o.l.

Garasja

Stødd umleið 40 m2 nettovídd.
Garasja skal hava eina 3 m breiða fjarðstýrda garasjuhurð, sum er minst 2,1 høg. Garasja nýtist ikki at vera upphitað rúm. Gott arbeiðsljós skal vera inni í garasju. 4 stk. el-stikk og 1 stk. tekniskt el-stikk skulu vera til elektrisk amboð. Í garasju skal vera reingerðarvask og krani. Gólvfrárenning, brunnar o.l. skulu gerast smbr. galdandi krøvum.
Garasjan skal hava eina løðistøð til elbilar.

4.2.9. Gongdir

Høvuðsinngongd
Stødd umleið 15 m2 nettovídd.
Høvuðsinngongd skal staðsetast beint við móttøkuna, sí eisini pkt. 4.2.6. Ynski er, at høvuðsinngongdin er innbjóðandi, rúmlig og opin. Innrættast skal durur, har møguleiki er at heingja jakkar/frakkar o.l. klæði.

Vesi til viðskiftafólk
Stødd umleið 5 m2 nettovídd.
Vesi til viðskiftafólk skal staðsetast beint við høvuðsinngongd og móttøku.
Vesi skal innrættast til fólk við rørslutarni, smb. BK17.

5. SKIPAN AV BYGGIØKINUM

5.1. Økið uttanum

Uppskot til sniðgeving av útiøkinum skal gerast.

Bygningurin og lendið uttandura skulu vera væl upplýst við ljósseting.

Uttanfyri bygningin skal ein løðistøð til elbilar staðsetast, har elbilar nemt kunnu sleppa til.

5.2. Atkomuvegur

Atkoman til bygningin skal vera frá vegnum á Hillingartanga, ið eisini gongur niðan til Sandavágs Timburhandil. Heildararbeiðstakarin skal í samráði við Vága kommunu taka støðu til íbinding millum byggipláss og kommunalan veg.

5.3. Parkeringspláss, atgongd, gøtur, terrassur o.l.

Parkeringsviðurskiftini skulu vera nøktandi. Tal av parkeringsbásum skal vera sambært BK17 og ásetingum frá avvarðandi kommunu.

Gøtur og vegir skulu við inngongdir hava eina vantrætta vídd upp á 150 x 150 cm

Áleggingar verða hesar:

- Vegir og parkeringspláss verða asfalterað.
- Parkeringsbásar skulu merkjast við strikum.
- Áleggingar í økinum skulu vera vinarligar í mun til rørslutarnað.
- Lendi skal uppbyggjast, so vatn verður veitt burtur til frárenningar.

6. INNLEGGINGAR

6.1. Alment um veitingar (til bygningin)

Skipanir/útbúnaður/stýringar skulu lýsast og veljast í mun til livitíð, viðlíkahald, burðardygd og heildarkostnað, eisini við atliti at orkunýtslu. Harumframt skulu skipanirnar/útbúnaðurin setast soleiðis, at rakstur og viðlíkahald kann gerast á nøktandi hátt.

Niðanfyrinevndu skipanir/útbúnaður skulu lúka nevndu krøv umframt at fylgja viðkomandi faknormum.

Allar veitingar sum til dømis el, vatn, tele og kloakk, eru í økinum, og skal bygningurin knýtast at verandi veitingum. Kannast skal, um verandi kommunalar veitingar eru nøktandi til virksemið í bygninginum. Um so er, at veitingarnar ikki eru nøktandi til tørvin, skal kommunan fráboðast.

Skipanir skulu fyrireikast og gerast, so at bygningurin er so orkuvinarligur, sum til ber í mun til upphiting og rakstur.

Bindast skal í verandi kloakkskipan og vatnveiting í økinum sambært krøvum frá Vága kommunu. Tele- og netskipan skal leggjast inn í bygningin.

Útgreinað krøv til veitingarnar eru partur av framhaldandi arbeiðinum og verða at skjalfesta sambært viðkomandi faknormum.

Allar innleggingar skulu prosjekterast við støði í galdandi normum og standardum.
Bindast skal í verandi skipanir í økinum sambært krøvum frá Vága kommunu.

Innleggingar skulu skipast soleiðis, at neyðug røkt av skipanum kann gerast á fullgóðan hátt.
Innleggingar skulu í størst møguligan mun leggjast soleiðis til rættis, at innrætting, rakstur og viðlíkahald gevur minst møguligt órógv fyri virksemi og brúkarar í húsinum, og harumframt skal øll útgerð í størst møguligan mun vera orkuvinarlig.

6.2. Kloakkskipan í lendi

Kloakkarbeiði skal gerast smbr. galdandi ásetingum í *"Norm for afløbsinstallationer, DS 432, 2. Udgave 2020"*, *"Afløbsinstallationer SBi-Anvisning nr. 255, 256, og 257"* og ásetingum frá Vága kommunu.
Kloakkskipanin skal gerast sum sundurskild frárenning (seperat system). Øll kloakkrør skulu vera PP Sn8 rør – smbr. Euronormar.

Heildararbeiðstakarin skal veita og uppseta ein rottanga á matrikkulin. Vága kommuna syrgir fyri, at rottangin verður íbundin tí kommunalu kloakkskipanina.

Á kloakkskipanina skulu setast reinsi- og inspektiónsbrunnar, sum skulu hava tøtt stoypijarnslok, hóskandi til ferðslu á staðnum. Diametur á brunni skal vera:

- Ø315, við dýpi upp til 50 cm
- Ø425, við dýpi 50 cm til 100 cm
- Ø600, við dýpi 100 cm til 150 cm

- Ø1250, við dýpi størri enn 150 cm – ella lendi tillagast eftir støðunum o.ø.

Á frárenning frá køki skal setast feittfráskiljari í hóskandi stødd við evju-/sandfangi og royndartøkubrunni.

Kloakkskipanin skal gjøgnum ø1250 reinsibrunn, bindast í verandi ø160mm teym, sum er lagdur inn á økið. Rel. kota á kloakkteymi skal fastsetast av heildararbeiðstakaranum, áðrenn prosjekteringin byrjar, umframt góðkennast av kommununi.

Fram við og undir bygningum skulu leggjast drenleiðingar sum Wavin. Legging og íbinding smbr. SBi Anvisning nr.255, 256,257.

Har tøtt yvirflata er á parkeringsøkinum, túninum v.m. skulu uppsetast vegbrunnar við sandfangi og vatnlási. Brunnar skulu enda við deksli ájavnt lendi.

Regn- og omanávatn skal beinast í gjøgnum ein ø1250 mm reinsibrunn bundið í verandi ø160 mm regnvatnsteym, sum er lagdur inná økið. Rel. kota á kloakkteymi skal fastsetast av heildararbeiðstakaranum, áðrenn prosjekteringin byrjar, umframt góðkennast av kommununi.

Øll kloakk- og frárenningarrør í jørð skulu gjøgnumskolast og kannast við kloakk-TV- áðrenn avhending. Skjalaprógvið skal hjáleggast avhendingina

Verður neyðugt við pumpubrunnum, skulu hesir vera úr PE tilfari við rustfríum rørum innan og við alarmskipan, sum kann skráseta við GSM-netið til Sjóvinnustýrið og á CTS-skipanina á staðnum.

Trýstleiðingar skulu vera úr PE tilfari.

Øll kloakkrør, sum verða løgd til fallrør, vesi ella aðrar sanitetseindir, skulu enda við fótbendi og muffu ájavnt lendisgólv. Rør til vesi skulu vera ø110 og frá køksvaski skal vera ø50. Tó skulu øll rør undir jørð og undir bygninginum vera í minsta lagi ø110.

Allir lutir skulu vera góðkendir smbr. galdandi reglum og normum.

Vága kommuna hevur ein Ø75 vatnleiðingsteym liggjandi upp at økinum. Høvuðsarbeiðstakarin hevur ábyrgd av, at avtalað verður við Vága kommunu, at kommunan leggur eina ø40 PE tn 10 høvuðsvatnleiðingsteym við stoppikrana inn á matrikkulin.

6.3. HVS installatiónir

6.3.1. Alment

Alt tilfar og gjørt arbeiði skal verða væl úr hondum greitt. Tað skal vera lætt at brúka, gera reint og viðlíkahalda installatiónir og lutir.

Allar installatiónir skulu lúka galdandi krøv til tryggjan móti brand- og røykspjaðing eftir Dansk Standard. Her verður serliga hugsað um tætting av rørum og ventilatiónskanalum, sum fara ígjøgnum brunaeindir og -skilagólv.

Óljóð – gangur – skal doyvast eftir galdandi krøvum, bæði úti og inni. Tryggjast skal, at ljóð og ristingar ikki fara í onnur rúm.

Øll rørskipan til hita og vatn skal leggjast soleiðis, at ekspansiónir kunnu upptakast í rørum, og at umvælingar og møguligar útskiftingar kunnu fremjast uttan ov stórt inntriv í bygningslutir.

Loddrættir føringsvegir skulu skipast í slokum, vatnrættir í lætt niðurtakiligum loftum.

Øll rørskipan verður dimensjonerað soleiðis, at sleppast skal undan óljóði og tæring orsakað av ov nógvari ferð í rørunum.

Til skráseting av nýstluni verða settir upp vatnmátarar á vatninnføringina og á kaltvatnstilgangin til heittvatnsframleiðsluútgerð. Hetta verður bundið í CTS-skipanina.

HVS installatiónir
Leiðingar skulu bjálvast eftir galdaldi normum við t.d. Rockwool Universalskálum við alu. Sjónligar leiðingar verða harumframt umgjørdar við køtzillørifti, sum verður smurt tvær ferðir við límvatni og málað. Í staðin kunnu leiðingar klæðast við Isogenopak. Eftir bjálving verða leiðingar merktar við ørvum, sum vísa streymleið og hvør leiðing tað er.

Kanalir skulu somuleiðis bjálvast smbr. galdandi normum.

Hitaverk
Hitaverksarbeiði skal fremjast smbr. galdandi ásetingum í seinastu útgávum av *"DS 469 Norm og Varmeanlæg"*. Hitaverkið skal vera ein grøn loysn sum til dømis jarðhiti, luft-til-vatn hitapumpa e.l.

Leiðingar
Høvuðsleiðingarnar skulu vera sum rustfrítt pressifittings sambært DS.

Rør og fittings skulu vera vesturevropeisk og av 1. floks góðsku.

Leiðingar skulu í størsta mun vera atkomuligar til viðlíkahald og umvælingar.

Hitaskipanin skal tryggja, at øll rúm (uttan bilhús o.l.) skulu hitast til 20-23°C, eftir ynski og tørvi. Alment er galdandi, at smidleiki (flekbilitetur) er í innrætting, og møguleikar seinni at leggja smærri rúm saman við størri ikki verða forðaðir.

Gólvhiti skal vera í øllum rúmum í bygninginum og hava avsperrings- og tømimøguleika við hvørt fordeilararør. Skipanin skal íbindast CTS, og umfatar tað t.d pumpir, temp. stýring av gólvhitaringrásunum v.m.

Gólvhitin skal leggjast við PEX rørum ø20x2,0 – við iltverju – uttan skoytir í gólvið, hava egnan felags automatik við blandisloyfu í tøknirúminum til innstilling av framrenningarhita og pumpu.

Skáp í hóskandi tali til fordeilararrør verða bygd inn í veggir. Gólvhitaverkið skal hava rúmhitastýring og trygging móti yvirhita. Tryggjast skal, at gólvið ikki gerst heitari enn 32°C.

Longd á sloyfum til gólvhita skal ikki vera longri enn vegleiðingin hjá veitaranum viðmælir. Í baðirúminum skal fløvi vera í gólvinum, sjálvt um nóg heitt er inni. Hetta verður tryggjað við rúmfølara við sensori. Allir rúmfølarar skulu hava streymveiting – t.e. ikki battarírikin.

Rørleiðingar skulu leggjast soleiðis, at víðkanir (ekspansjónir) frítt kunnu upptakast í rørunum.

6.3.2. Sanitet

Sanitetsarbeiði skal gerast smbr. galdandi ásetingum í seinastu útgávu av *"Norm for afløbsinstallationer, DS 432"*, *"Norm for vaninstallationer, DS 439"*, *"SBi-anvisning 234 til 236, og 255 til 257, afløbsinstallationer"* og møguligum ásetingum, sum Vága kommuna setir.

Alment er galdandi, at innandura frárenningar – í møguligum kjallara – frá vesum og øðrum sanitetseindum skulu vera sum Wavin Asto. Kloakkútlufting verður førd upp um tak við inndekningi.

Góðskan skal vera úr skandinaviskari góðsku sum t.d. IFO ella Gustavsberg.

6.3.3. Leiðingar innandura

Høvuðsheitt- og kaltvatnsrør skulu vera úr kopari smbr. DS 2110 040102, hørð koparrør. Rør og fittings skulu vera vesturevropeisk og 1. floks. Teymar til sanitetseindir skulu vera útskiftiligir PEX-rør-í-rør, við koplingsdósum í veggi. Rørleiðingar skulu leggjast soleiðis, at ekspanstiónir frítt kunnu upptakast í rørunum. Sirkulatión skal vera á heita vatninum, og byggjast skulu inn í skipanina neyðugir termostatiskir strongreguleringsventilar fyri at tryggja nøktandi hitastig á heita vatninum í øllum pørum í skipanini.

6.3.4. Brandskáp

Brandskáp í neyðugum tali skulu veitast og uppsetast smbr. ávísingum í BK17. Brandskáp skulu hava ¾" brandventil, strálurør og 30 metur ¾" slangu. Brandskáp skulu byggjast inn i veggir – tó ikki brandsektiónsveggir. Brandskápini skulu góðkennast av DBI.

6.3.5. Vesi

Vesir til rørslutarnað skulu vera vegghongd og framd smbr. vegleiðing og krøvum í BK17.

Onnur vesi skulu eisini vera vegghongd við innbygdum vatntanga (sisternu) og uppsetingargrind í veggi. Øll vesi skulu vera hvít, hava dupultan skoliknøtt og hvítt, hart plastsetur.

6.3.6. Vøsk

Hondvøsk til rørslutarnað skulu hava hóskandi støddd. Blandingskrani skal vera egnaður til rørslutarnað og við umvælingarkrana at festa í koplingsdósir í veggi, flex frárenning, sum bundin verður í muffu í veggi og síðan í síðu á gólvfrárenning ella bundin í vatnlás sum Pressalit goymt í veggi.

Onnur hondvøsk skulu vera umleið 570 x 440 mm til støddar, hava blandingskrana, forkromaðar rosettir, umvælingarkranar at festa koplingsdósir í veggi, forkromað pungvatnlás, sum verður bundið í muffu í veggi. Sjónligir vatnteymar skulu vera forkromaðir.

Køksvask og reingerðarvask skulu vera rustfrí og úr góðsku sum Juvel umframt hava ávikavist egnaðar køks - og reingerðarkranar

Tað skal vera lætt atkomuligt hjá fakmanni at koma framat til røkt av t.d. vatnlási, sum er inni í vegginum. Ein lúka í hóskandi stødd, sum lætt kann skrúvast av, skal vera til hvørt tílíkt stað.

Vatnteymar til blandingskrana skulu vera úr flex tilfari.

6.3.7. Skiftingarrúm

Brúsur í brúsurúmum skulu vera termostatiskir brúsublandingskranar við strong, slangu og brúsuhøvdi, sum kann innstillast. Handtøk á brúsublandingskrana skulu vera brúkaravinarlig til rørslutarnað.

6.3.8. Gólvfrárenning

Gólvfrárenning skal vera á vesum, í skiftirúmi, reingerðarúmi, vaskirúmi og tøknirúmi. Gólvfrárenningarnar skulu vera úr rustfríum stáli sum Blücher við P-vatnlásum. Har vandi er fyri, at frárenningin turkar út, skal gólvfrárenningin íbindast eitt hondvask í sama rúmi.

Í garasju skal roknast við rennu sum Sapo Drain við galvaniseraðari rist og vatnlási.

Á vatninnføring í tøknirúm skal vera sett reduktiónsventilur og ruskfiltur við møguleika fyri by-pass.

6.3.9. Onnur sanitetsútgerð

Við hvørt hondvask skal roknast við veiting og uppseting av speglum. Vesirulluhaldari, eykapappírshaldari, vegghongd vesibust, krókar til handklæði, sápudispensari, papírsautomat.

Uttandura frosttryggir spulikranar skulu setast upp í hóskandi tali, so alt útiøkið rundan um bygningin kann røkkast við 25 m slangu eitt nú við ruskplássið og onnur støð, har spulað verður.
Innandura verða settir upp spulikranar til heitt og kalt vatn – við slanguforskrúning – í tøknirúmi.

6.4. Ventilatión

Ventilatiónsarbeiðið skal gerast smbr. galdandi ásetingum í seinastu útgávu av *"DS447 Norm for ventilationsanlæg"*, *"DS428 Brandtekniske foranstaltninger ved ventilationsanlæg"* og eftir BK 17.

Ventilationskipanin skal vera ein VAV-skipan. T.e. luft eftir tørvi og stýrast eftir CO_2 oghitastigi.

Køkurin skal hava eymhettu, sum skal gerast smbr. BK17, og íbindast ventilatiónsskipanina. Tó skal eymhettan hava egið filtur á, soleiðis at feitt v.m. ikki kemur inn í ventilatiónsskipanina.

Skrivstovur skulu hava innblástur og útsúgving.

Ventilatiónsverk skulu vera løtt atkomulig og skulu hava hóskandi tal á reinsi- og inspektiónslúkum.

Ventilatiónsverk skulu vera løtt at reinsa.

Ventilatiónsrúm og teknikrúm skulu í stødd og innrætting vera soleiðs, at arbeiðið í sambandi við viðlíkahald og útskifting lætt kann fara fram.

Servararúmið skal hava varandi køling gjøgnum ventilatiónina.

6.5. CTS skipan

Fyri allan bygningin verður gjørd ein CTS skipan við fullfíggjari automatiskari stýring, regulering og eftiransing

Øll zonuspjell og spjell til luft eftir tørvi í ventilatiónsverkum skulu bindast í CTS skipanina soleiðis, at tey kunnu eftiransast og yvirstýrast

Í hita- og sanitetsverkunum skal allur hiti, trýst, vatnmongdir, nýstla v.m. kunna førast inn í CTS-skipanina. Í ventilatiónsverkum skulu allar verks- og rakstrarfráboðanir, herundir trýstalarmar á filtrum og blásarum, alarmfráboðan, herundir bruna og frost, setast í CTS.

Fráboðan um møguligan feil á pumpubrunninum á kloakkskipanini skal fráboðast/førast á CTS.

Eru verk – hita, sanitet, ventilatión – deild í partar (sonur), skulu teir kunna stýrast og eftiransast umvegis CTS.

7. EL-ARBEIÐI

El skipanin skal nøkta allar skipanir í mun til virksemi í bygninginum. El skipanir skulu tillagast virkseminum við atliti at i smidleika (fleksibiliti) í mun til møguligar broytingar, tillagingar v.m. í sambandi við framtíðarynskir.

Føringsvegir: Allir føringsvegir skulu leggjast til rættis soleiðis, at innleggingar eru væl skipaðar og ruddiligar og lætt atkomuligar fyri broytingum og útbyggingum.

Innleggingarbakkar skulu taka atlit at ymisku skipanunum soleiðis, at tær eru skipaðar hvør sær á skynsaman hátt. Føringarvegir skulu brunatryggjast í mun til brunaflokkar.

7.1. Almennar ávísingar viðvíkjandi el-arbeiðum

Innandura skulu el-innleggingar vera í samsvari við fylgjandi alment galdandi skjøl og ásetingar v.m.:

1. Føroyska el-lóggávan
2. Treytir, ið SEV ásetir, herundir galdandi el-innleggingarbók
3. Sterkstreymsreglugerðin, eletriskar innleggingar, kap. 6 (SB6)
4. Sterkstreymsreglugerðin, lágspenningstalvur, EN60439-1 til EN60439-5
5. Sterkstreymsreglugerðin, elektriskt tilfar á maskinum, EN60439-5
6. Elráð-fráboðanir frá Sikkerhedsstyrelsen
7. DS/EN 12464-1: Lys og belysning
8. Ávísingar og vegleiðingar viðvíkjandi útlíkning og potentialjavnan frá www.sik.dk
9. EMC-direktivið
10. Galdandi kunngerð um brunaverju og brunatrygd
11. Viðkomandi leiðreglur og vegleiðingar frá DBI.
12. Galdandi kunngerðir frá Arbeiðseftirlitinum.
13. Føroyska byggikunngerðin BK17 – íroknað møgulig ískoyti
14. Elarbejder, illustration og vejledning, udgivet af F.R.I. og ELFO
15. Møgulig krøv og ásetingar, sum Vága kommuna setir.

Uttandura skulu el-innleggingar vera í samsvari við fylgjandi alment galdandi skjøl og ásetingar v.m.:

16. Vejbelysning, vejregler for vejbelysning, udg. Vejdirekoratet, Vejregelrådet, marts 1999
17. Vejbelysning, Håndbog for tekniske forhold, udg. Vejdirektoratet, vejregelrådet, marts 1999
18. Vejbelysning, Håndbog for visuel udformning, udg. Vejdirektoratet, Vejregelrådet, marts 1999

Um ósamsvar er millum tey her nevndu krøvini og krøvini, sum nevnd eru undir parti *"1.2 mynduleikakrøv"*, hava krøvini, sum nevnd eru undir parti *1.2 Mynduleikakrøv"* hægri raðfesting, uttan so at talan er um krøv, ið viðvíkja el-trygdini.

Tryggjast skal, at tað fyri hvørja skipan sær verður gjørd ein merkisskipan, ið lutir, kaðlar og íbindingar verða merkt eftir. Kaðlar skulu á haldgóðan hátt merkjast í báðum endum, hvørjumegin gjøgnumføringar, og annars har umstøðurnar kunnu gera tað trupult at fylgja kaðlunum.

Rúm til talvur, X-felt, servarar og líknandi el-tekniska útgerð skulu staðsetast soleiðis, at innleggingar, ið kunnu elva til vatnskaðar, ikki eru í ella yvir hesum rúmum. Harumframt skal servararúm hava aktiva køling.

7.2. Tilfar

Alt tilfar, ið verður brúkt, skal vera CE-merkt. El-lutir og skipanir skulu ikki íbindast el-innleggingar, um hetta ikki er CE-merkt.

Alt tilfar skal veljast soleiðis, at harðføri og IP-flokkur samsvara við umhvørvið, har tilfarið verður uppsett.

Allir kaðlar skulu vera halogen og PVC-fríðir.

Tá talan er um ljósarmatur, skal dentur leggjast á lága orkunýslu, og at góðskan á hesum verður sum eitt nú tey frá framleiðarunum Louis Poulsen, Thorn, Siteco, Fagerhult og Hoffmeister. Um teir bjóðandi fáa møguleika at veita tilboð við hvør sínum ljósarmaturum, skal tryggjast, at hetta er so mikið útgreinað, at tilboðini kunnu metast í mun til hvørt annað.

7.3. Talvur

Roknast skal við einari høvuðstalvu og einari passandi nøgd av bólkatalvum, alt eftir hvussu skapið og innrættningin verða á bygninginum. Ventilatiónsskipanir, stórkøkurin, ljósskipanir úti og felags orkubrúk annars skulu veitast úr høvuðstalvuni. Tað merkir, at høvuðsreglan skal vera tann, at ljós og vanlig kraft í teimum økjunum, sum verða dekkað av bólkatalvunum, verða veitt frá bólkatalvunum, meðan annað verður veitt frá høvuðstalvuni

Talvurnar skulu allar byggjast eftir kortslutningssteymunum og stoytstreymunum, har talvurnar verða uppsettar, roknað eftir upplýsningum frá SEV.

Talvurnar skulu í høvuðsheitum veitast við:

- Inngangsfelti og avbrótara (bert galdandi fyri høvuðstalvuna)
- Plássi til SEV kWh-mátara við tilhoyrandi streymtransformarum (bert galdandi fyri høvuðstalvuna)
- Feilstreym- og bólkaavbrótarum/verjum.
- Stýringum
- Kaðalfeltum og jørðskinnarum við klemmum
- Skeltum við øllum neyðugum og kravdum upplýsingum um talvubyggjara, talvuslag og raðnummar, slag og stødd av sikkrungum, ið verja talvuna, nr. á SEV-skápinum, har hesar sikkringar eru, umframt kortslugningsdata smbr. nýttum merkishátti. Skeltir skulu eisini vera við feilstreymsavbrótarum, bólkaavbrótarum, sikkringshaldarum og aðrari koplings- og stýriútgerð í talvuni, við upplýsingum um størstu loyvdu sikkringar, og hvørjir partar av innleggingum verða veittir frá lutinum.
- Bóklingi við tekningum, diagrammum og øðrum viðkomandi upplýsingum og frágreiðingum, ísett lumma á hurðblað.
- Okkurt um 25% tøkum plássi, javnt deilt yvir alla talvuna.

Fyri høvuðstalvuna er galdandi, at henda skal verða plátukapslað á gólvsokli og staðsetast soleiðis, at til ber at vaska talvukassan um neyðugt.

7.4. Stikkleiðing

Stikkleiðingin skal leggjast frá skápi hjá SEV. Kannast skal við SEV, hvat skáp skal nýtast.

Støddir á stikkleiðingssikkring (SEV-íbinding) skulu veljast, eftir at greitt er, hvat samlaða lastin verður fyri bygningin. Stikkleiðingin og inngangsfeltið í høvuðstalvuni skulu dimensjonerast eftir einastu last, ið er 50% yvir støddina á stikkleiðingssikkringunum.

7.5. Jørðingsskipan

Høvuðsjørðjavningin skal gerast smbr. SB6, 413.1.2.1, og soleiðis at fylgjandi leiðandi lutir verða bundnir í høvuðsjørðjavningina.

- El-føringsvegur úr leiðandi tilfari
- HVS- og ventilatiónsskipanir
- Gjøgnumgangandi bygningslutir úr metali
- Armering í lættbetongi og pussi, ið skal samanbindast í høvuðsútlýkningina

Allir lutir úr metal, sum koma inn í bygningin, skulu bindast í høvuðsútlíkningina so nær sum møguligt við staðið, har teir koma inn í bygningin.

7.5.1. Jørðjavning

Í bygninginum skal tað við jørdelektrodum (einari til virksemisjørð og einari til verjujørð), høvuðsjørðjavningarskinnarum við høvuðstalvuna (einum til drift- og einum til verjujørð), jørðjavningarskinnarum við aðrar talvur og runt um í bygninginum, feilstreymsavbrotarum i talvum umframt einum vælvirkandi jørðjavningarkervi gerast ein jørð- og jørðjavningarskipan, samsvarandi SB6, 413 og kap. 54.

Íbindingar í jørdelektrodur skulu gerast soleiðis, at hesar eru atkomuligar, eftir at arbeiðið er liðugt.

Jørð- og jørðjavningarskipanin skal vera so mikið virkin, at samløgan av elektriskum mótstøðum frá neutralari jørð og fram til ein og hvønn útsettan lut ongantíð verður so stór, at ein møguligur nertispenningur kann gerast størri enn evsta mark sambært Sterkstreymsreglugerðini við teimum útloysarastreymunum, sum feilstreymsavbrótararnir í talvuni eru merktir við. Jørð- og jørðjavningarskipanin skal gerast áðrenn aðrar el- innleggingar fyri at verja persónar og skipanir.

Jørðingin og potensilaútlíkningin skulu gerast við egnaðum tilfari. Allar innstoyptar íbindingar skulu mátast og skjalprógvast, áðrenn stoypt verður.

Allir sterkstreymskaðlar uttan stikkleiðingskaðalin skulu veitast við jørðleiðarum, sum skulu íbindast egna jørðklemmu í báðum endum. Kaðlar, sum verða lagdir frá talvunum, skulu bindast í jørðskinnarin i talvuni.

7.6. Kaðalføringsvegir

Við kaðalstigum, innleggingarrennum og rørum i lendu skulu føringsvegir skipast til el-innleggingarnar.

Føringsvegirnir skulu dimensjonerast soleiðis, at tað er á leið 50% tøkt pláss, eftir at innleggingin er liðug, og soleiðis at teir tola tað tyngdina og ávirkanina annars, ið teir verða útsettir fyri.

Føringsvegirnir skulu samskipast við aðrar bygningslutir soleiðis, at tað er nøktandi pláss, har hesir verða uppsettir, og soleiðis at teir eru lætt atkomuligir, eftir at bygningurin er liðugur.

Føringsvegir skulu veitast við skiljisporum soleiðis, at ávikavist sterkstreym, veikstreym, net og kaðlar hoyrandi til maskinútbúnað kunnu leggjast hvør sær. Í gjøgnumføringum í veggjum og dekkum, sum skulu bruna- ella ljóðtettast, verða kaðalføringsvegir ikki førdir óbrotnir ígjøgnum, men skulu teir enda hvørjumegin gjøgnumføringina.

7.7. Bruna- og ljóðtettingar

Allar tær gjøgnumføringar í veggir og dekk, sum verða gjørdar til el-innleggingarnar, skulu tettast soleiðis, at hesar lúka tey krøvini, sum sett verða til bruna, ljóð og vætu.

Tettingar fyri bruna skulu fremjast við tilfari, ið brunamyndugleikarnir kunnu góðtaka, og tettast soleiðis, at tettingarnar eru á sama BD-støði sum bygningsluturin, sum gjøgnumføringin verður framd í.

7.8. Ljósinnleggingar

Serlig atlit skulu takast til ljósið. Ljósútbúnaður skal vera lættur at røkja, og skal dentur leggjast á orkuvinarligar ljóskeldur. Ljósútbúnaður skal vera samsvarandi reglum um ljós á arbeiðsplássum.

Ljósinnleggingin í bygninginum skal fyri hvørt øki/rúm sær skipast eftir nýtsluni og soleiðis, at ljósinnleggingin er í samljóði við arkitekturin i bygninginum. I teimum rúmunum, ið skulu kunna deilast við skothurðum, skal hvør partur kunna stýrast fyri seg. Ljósið í bygninginum skal í størst møguligan mun deilast yvir tvær fasur og gerast soleiðis, at tey krøv, Sterkstreymsreglugerðin setur til ljós í felagsøkjum og rýmingarleiðum, verða fylgd.

Í felagsøkjum, gongsøkjum og skrivstovum skal ljósið gerast við dagsljósstýring. Annað ljós skal eftir tørvi stýrast við rørslu-/PIR-følarum og vanligum avbrótarum.

Rørsluføla rarnir skulu sløkkja ljósið, tá eingin er í rúmunum. Ljósið í gongsøkjum skal tendrast, tá komið verður inn í hølið. Um náttina skal gongsljósið dempast niður í 10 % av ljóssstyrkini, og tá ið rørsla er í gongini, skal ljósið fara upp í fulla styrki.

Á parkeringsøkinum og uttandura tilhaldssøkjum skal verða ljós, ið við vegglampum, pullartum og/ella steyrum verður skipað soleiðis, at tað er í trá við sniðgevingina av økinum annars.

7.9. Kraftinnleggingar

Ein reingerðarstikkkontakt, 230V, skal setast upp fyri hvørjar 10 metrar, tó í minsta lagi ein í hvørjum rúmi. Stikkkontakt skal vera við vindeygu til jólapynt.

Tað skal vera ein passandi nøgd av tøkum stikkkontaktum, 230V, í bygninginum, deildar runt við passandi frástøðu.

Í tøknirúmum og á øðrum hóskandi støðum skulu, umframt vanligar 230V-stikkkontaktir, eisini vera tøkar tekniskar stikkkontaktir, 3 x 400V.

Kraft skal leggjast fram til alla leysa og fasta útgerð og tól sum til dømis hvítvørur og køksstólur.

ETV-stikkkontaktirnar skulu ikki streymveitast frá somu gruppum, sum tær vanligu 230V stikkkontaktirnar. Í talvunum skulu gruppurnar bólkast soleiðis, at tað er gjørligt at seta eina UPS-skipan framman fyri ETV-gruppurnar, uttan at tað verður neyðugt at umbyggja talvurnar ella broyta innleggingarnar.

7.9.1. Kraftinnleggingar til HVS- og ventilatiónsskipanir

Við í el-arbeiðinum skulu vera kraftveitingar til grøna orkuskipan og ventilatiónsverk. Ráðgevin, ið varðar av hesum skipanunum, lýsir orkutørv og vav, tá prosjekteringin er komin so mikið áleiðis, at ráðgevin kennir hesar upplýsingarnar.

Til valdu hitaskipan (íroknað hitavekslara og pumpur v.m.) skal leggjast kraftveiting samsvarandi støddini á skipanini.

Til ventilatiónsverk skulu leggjast kraftveitingar samsvarandi støddunum á verkunum.

Veitingarkaðlarnir til tær her nevndu skipanirnar skulu enda í trygdaravbrótara, sum verður markamótið millum el- og HVS-arbeiðstøkuna. T.e. skipanartalvur og stýrikassar við eftirfylgjandi kaðlum og lutum.

Vænta verður, at arbeiðstakararnir, ið varða av hesum skipanunum, veita, uppseta/leggja komponentar og kaðlar, ið hoyra til skipanirnar, og at el-innleggjarin fremur íbindingarnar, (um hetta ikki verður gjørt av einum CTS-arbeiðstakara), og verður við, tá ið skipanirnar verða royndar og innkoyrdar.

7.10. Dátukervi

Veitast skal eitt dátukervi við fastnet-stikkum við arbeiðsstøðir, routarar, maskinur, skipanir og annað, ið krevur fastnet samband. Kervið skal vera á CAT6A-støði og testast við egnaðum mátiamboði.

Frá netinum hjá FT- Net skulu kopar og fipur stikkleiðingar leggjast til eitt gólvrakk. Umframt at X-felt skal vera í rakkinum, skal pláss vera yvir servarum. Rakkið skal staðsetast soleiðis, at sleppast kann inn í tað frá øllum fýra síðunum, og soleiðis at hølið, tað verður sett inn í, kann læsast fyri óviðkomandi. Rackskápið skal veitast við patchpanelum, patchkaðalhaldarum, amboðshill til virkna útgerð, "Powerpaneli" við minst 5 EDV- stikkdósum og útgerð, ið annars kann sigast at vera ein natúrligur partur av einum slíkum rakkskápi. Rackskápið skal íbindast høvuðsjørðjavningarskinnaran við høvuðstalvuna.

Bygningurin skal veitast við einum fullfíggjaðum tráðleysum netið.

Ein arbeiðstøð skal hava:

- 4 Fastnet-stikk
- 3 EDV/No-break stikkontaktir (hetta so innleggingin er fyrireikað til no-break veiting)
- 3 vanligar stikkkontaktir

Øll úttøk skulu merkjast eftir einari skipan, ið umfatar rakk-nummar, hædd, rum nummar og stikk nummar. Vænta verður ikki, at arbeiðstøkan fevnir um aktiva útgerð.

7.11. Lyklaskipan

Til bygningin skal veitast ein elektronisk atgongueftirlitsskipan (ADK) og læsiskipan til uttandura og innandura brúk.

Umsiting og broytingar skulu kunna fremjast frá deild fyri umsiting og móttøku, staðsett á hóskandi staði. Á hesari hesi deild skulu eisini verða myndir, sum vísa støðuna hjá hurðunum, sum eru umfataðir av skipanini. Hesar myndir skulu eisini kunna síggjast umvegis alnótina, um tørvur verður mettur at vera á tí.

Skipanin skal taka støði í disponeringini av bygninginum, har tað verður lýst, hvussu ferðast verður í bygninginum, hvussu bygningurin verður deildur í sonur, og hvussu trygg/lokað tey ymisku rúmini og økini skulu vera.

Metast skal um, um atkomuhurðar inn í bygningin og inn á deildir skulu kunna yvirstýrast av útvaldum starvsfólki.

7.12. Sjálvvirkandi brunaávaringarskipan (ABA)

Bygningurin kann veitast við eini ABA-skipan, við brunavarnarum (brandmeldarum), brunatrýstum, lúrum og sjálvvirkandi afturlatingarhurdum (ABDL) o.ø. smbr. myndugleikaávísingum og galdandi krøvum.

Skipanin skal veitast við einari miðstøð, ið skal staðsetast í samráði við sløkkiliðið og annars soleiðis, at hon er lætt atkomulig.

Brunaávaringarskipanin skal býtast sundur í bólkar. Ein fyri hvørt øki/deild. Skipanin skal hava telefonsamband við sløkkiliðsstøðina.

7.12.1. Sjálvvirkandi hurðaafturlatingarskipan (ABDL)

Hurðar millum brunadeildir, ið áhaldandi kunnu standa opnar, skulu veitast við ABDL-skipanum, ið tryggja, at hesar hurðarnar loka, um eldur er i

Um skipanirnar ikki verða gjørdar sum partar av omanfyri nevndu ABA-skipan, skulu tær veitast við hvør sínari miðstøð og brunavarnarum uppsettir á loft yvir brunahurðini. Ein hvørjumegin hurðina.

Stýrikaðlar til hurðapumpur við elektromagnetiskum fasthaldi skulu bindast beinleiðis í hurðapumpurnar.

8. KRØV OG YNSKI TIL BYGNINGSLUTIR

Allir bygningslutir skulu gerast, samansetast/byggjast og nýtast sum fyriskrivað í tilhoyrandi reglum, krøvum, vegleiðingum og normum. Útgreinað krøv til bygningslutir eru partur av framhaldandi prosjekteringararbeiðinum og skulu skjalfestast sambært viðkomandi faknormum.

Val av tilfari skal vera við høgari góðsku í mun til haldføri og ellisdæmi. Bygningslutirnir hvør sær skulu hava langa livitíð og gerast soleiðis, at viðlíkahaldið er so avmarkað, sum til ber. Niðanfyri eru nakrir bygningslutir nevndir.

Bygningurin skal í minsta lagi yvirhalda ljóðkrøvini í BR18 (§ 368 - § 376). Viðmælt verður, at tilhoyrandi vegleiðing pkt. 5.0 til 5.4 verður nýtt sum grundarlag undir prosjektering.

Útroknan av luftljóðsbjálving í sambandi við prosjektering skal gerast smbr.:

> *DS/EN ISO 12354-1, Bygningsakustik - Beregning af bygningers akustiske egenskaber ud fra bygningselementers egenskaber - Del 1: Luftlydisolation mellem rum (Dansk Standard, 2017a).*
> *DS/EN ISO 12354-2, Bygningsakustik - Beregning af bygningers akustiske egenskaber ud fra bygningselementers egenskaber - Del 2: Trinlydisolation mellem rum (Dansk Standard, 2017b)*

Útroknan av eftirljómstíð og ljóðísúgvin í rúmum í sambandi við prosjektering skal gerast smbr.:

> *DS/EN 12354-6, Bygningsakustik - Beregning af bygningers akustiske egenskaber ud fra bygningselementers egenskaber - Del 6: Lydabsorption i lukkede rum (Dansk Standard, 2004).*

8.1. Konstruktiónir

Konstruktiónirnar skulu dimensjonerast og eftirvísast sambært galdandi faknormum við tilhoyrandi donskum "anneksum". Val av konstruktiónum skal vera kent og tryggja skynsaman byggihátt.

Atlit skulu sýnast at føroyska veðurlagnum, og skulu kons5truktiónirnar dimensionerast til eina vindlast svarandi til 55 m/s. Tekjan dimensionerast eftir DS/EN 1991-1-4, tó í minsta lagi til eina vindlast svarandi til 55 m/s.

Bygningurin skal dimensijonerast fyri nyttulastir smbr. DS EN 1991-1-1. Bygningurin skal dimensjonerast sum kontórbygningur, lastflokki B. Tó skal lastflokkur E brúkast, har goymsla/skjalasavn eru.

Konstruktiónirnar skulu verða haldgóðar í mun til regn, kava og vind.

Berandi konstruktiónir skulu fyrireikast og gerast við atliti at størst møguligum fleksibiliteti. Berandi betongveggir verða tí bert nýttir í tann mun, hetta er neyðugt fyri ta berandi skipanina og heildarstøðufestið. Konstruktiónir, sum eru úr betongi og standa berar, skulu dustbindast.

Uttandura betong skal dimensjonerast í mun til serliga ágangandi (aggressiva) umhvørvið í Føroyum.

Uttandura stál skal galvaniserast eftir DS/EN 1461 og hartil málast uttan eftir umhvørvisflokki C5M-H smbr. DS/EN 12944.

Alt betong og stál til uttandura bygging skal sum heild vera við atliti at umhvørvisflokki C5.
Stál til uttandura bygging skulu galvaniserast eftir DS EN 1461 og hartil málast uttan sambært DS EN 12944.

Til innandura konstruktiónir verður "moderatur umhvørvisflokkur" loyvdur, men kortini skal øll betongtjúkd uttan á armering vera við atliti at tí til eitt og hvørt stað í bygninginum galdandi brunatrygdarflokk.

8.2. Lastir og deformatiónir

Lastásetingin fyri bygningin skal vera samsvarandi Eurocode-norminum fyri last og trygd EN1990 og EN 1991 við niðanfyri tilskilaðu tillagingum.

8.2.1. Vindlastir

Bygningurin skal dimensjonerast fyri eina 2 sek. vindferð upp á 55 m/s.

8.2.2. Kavalastir

Eyðkenda (karakteristiska) lendisvirðið (terrænværdi) verður sett til 1,0 kN/m^2. Formfaktorar skulu samsvara ásetingunum í DS/EN 1991-1-3.

8.2.3. Jørðtrýst

Veggir móti jørð skulu, umframt loddrætta last, eisini dimensionerast fyri jørðtrýst við yvirflatulast frá møguligari ferðslu.
Umframt lastina í tí lidna bygninginum skulu veggirnir dimensionerast fyri allar lastir, sum teir kunnu verða útsettir fyri, meðan bygt verður.

8.2.4. Deformatiónir

Umframt berievni skulu konstruktiónirnar eisini dimensionerast fyri stívleika. Mest loyvda niðurboygging fyri betongdekk og -bjálkar er l/500 fyri nýstlulast. Fyri stálbjálkar í dekkkonstruktiónum er hon l/400 og fyri stál í takkostruktión og útveggjum (bjálkar og súlur) l/350.

8.3. Framsíður

Val av tilfari og bygningslutum í framsíðunum skal fremjast við atliti at kendum og haldførum tilfari og bygningsloysnum. Hædd skal takast fyri, at útsjónd passar til umhvørvið og hevur ein maritiman dám. Bygningssniðið skal vera tillagað veðrinum (sól, regni og vindi) soleiðis, at bygningurin bæði kann gagnnýta og samstundis verjast fyri náttúrukreftum.

8.4. Tekja

Tekja skal byggjast úr dygdargóðum tilfari egnað til føroyska veðurlagið, undirskipað verðurlagið á Giljanesi. Takformur skal vera einfaldur og við góðum og kendum loysnum. Tað verður sæð sum jaligt, um tekjan hevur eitt hall á minst 15 stig, tó er hetta ikki eitt krav. Um heildararbeiðstakarin kann veita trygd fyri síni loysn, umframt at tryggingardfeløg og mynduleikar góðkenna loysnina, so kann halli á tekjuni fara niður á 1:30. Tekjan skal dimensjonerast til eina vindlast svarandi til 55 m/s. Um heildararbeiðstakarin velur eina loysn við pvc-membrani ella takpappi, so skal góðskan vera sambært DS/EN 13707:2013.

8.5. Vindeygu og størri glasumráðir

Vindeygu skulu vera vindeygu, sum hava góðar royndir í Føroyum.
Val av vindeygum og møguligum glasumráðum skal passa til føroyska veðurlagið, og tey skulu verða staðsett skilagott í mun til veður og vind. Hugsað eigur at verða um haldføri og viðlíkahald, soleiðis at livitíðin gerst long. Somuleiðis eigur at verða hugsað um inniumhvørvi og sólávirkan inn í bygningin bæði í sambandi við ljós og hita.

8.6. Avskerming

Øll vindeygu skulu kunna avskermast við sólavvísandi lamellgardinum ella sólavvísandi rulligardinum.
Allir glasinnveggir skulu kunna avskermast antin við lamellgardinum ella foliu.

8.7. Skilaveggir

Skilaveggir og glasumráðir skulu lúka styrkis-, ljóð- og brunakrøv. Skilaveggir skulu gerast úr tilfari við neyðugari styrki at bera vegghongd innbúgv og útbúnað og skulu fyrireikast til hetta. Hornaverja skal setast á øll horn, ið venda úteftir.

Bygningsánarin ynskir at hava útsýni frá skrivstovum út yvir felagsøkir. Tí verður biðið um ein optiónspris upp á glasveggir. Hesir glasveggir skulu lúka galdandi brunakrøv umframt ljóðkrøv lýst í pkt. 8.

Gjøgnumføringar í skilaveggjum skulu ljóð- og brunatettast. Gjøgnumføringar skulu í mest møguligan mun leggjast inn frá felagsøkjunum.

Har valt verður innandura glasumráðir, skal glas vera hert og laminerað trygdarglas. Sjónlig merking skal setast á glasumráðir, sum gera glasveggin sjónligan.

Í vátrúmum skulu serlig fyrilit havast fyri tættleikanum í øllum rúminum, eisini har ymiskt tilfar verður bygt saman, so sum millum vegg og gólv og í hornum.

Skilaveggir, sum eru úr betongi og standa berir, skulu dustbindast og tryggja góða ljóðgóðsku.

8.8. Gólv

Gólv skal vera úr slitsterkum og viðlíkahaldsløttum tilfari. Tilfarsvalið skal taka atlit at, at umhvørvið skal vera innbjóðandi, og at ferðsla við koyristólum kann fara fram uttan trupulleikar.

Høvuðsinngongdin skal hava flísaálegging, ið hóskar til gólvhita, umframt mottur, sum tryggja, at vátir og skitnir skógvar og koyristólar verða turrir/reinir.

8.9. Loft

Loftini skulu gerast og fyrireikast soleiðis, at innleggingar verða fjaldar. Loftini skulu tryggja góð ljóðviðurskifti umframt at vera løtt at halda rein. Um træbetongloft verða nýtt, skulu hesi vera málað. Niðurhongd loft skulu kunna takast niður á hóskandi støðum, so tað slepst til tøkniligar innleggingar alla staðni, har tað er neyðugt, og uttan at loftini farast av hesum.

Á baðirúmum skulu loft tola vætu. Loft skulu kunna málast og gerast rein eftir tørvi.

Um ber betongloft verða nýtt, so skulu hesi vera dustbundin og tryggja góða ljóðgóðsku.

8.10. Út- og innhurðar

Høvuðshurðar skulu vera úr góðari góðsku, egnaðar til føroyska veðurlagið og vera uttan hæddar (niveaufri). Høvuðshurðar skulu vera slitsterkar og harðførar við góðari gátt. Høvuðshurð skal vera vard undir taki. Høvuðsúthurðar skulu vera M9.

Innhurðar skulu vera vanligar hurðar og ikki skjótihurðar. Innhurðar skulu vera í minsta lagi M9.
Hurðar inn til vesi og baðirúm skulu vera vátrúmshurðar. Innhurðar skulu vera úr góðari góðsku.

8.11. Vátrúm

Vátrúm, so sum høli til reingerð, vesirúm, køkur o.l, skulu vátrúmstryggjast.

9. BJÁLVINGARKRØV O.L. BYGGITEKNISK KRØV

Bygningurin skal verða gjørdur soleiðis, at krøv til orkutørv í BK17 eru nøktað.

9.1. Tættleiki

Klimaskermurin skal uppbyggjast við vindtættum klædningi á útsíðu og damsperru. Dampsperran skal vera við innbygdari armering sum Isover Vario Duplex við tilhoyrandi tilfari til tetting við samankomingar og rundan um gjøgnumføringar.

Fast undirlag skal vera undir øllum dampsperrusamankomingum.

Allar tekniskar leiðingar í klimaskerminum skulu vera innan fyri dampsperruna

Fyri at tryggja at bygningurin lýkur tættleikakrøvini, skal trýstroynd gerast, so skjótt sum bygningurin er vindtættur, soleiðis at ótættleikar kunnu finnast og tettast.

Tá bygningurin er liðugur, skal nýggj trýstroynd gerast, og endaligi tættleikin staðfestast.

9.2. Orkurammuútrokning

Skjalprógvast skal, at bygningurin lýkur omanfyrinevndu krøv við, at orkurammuútrokning verður gjørd eftir BK17.

10. INNBÚGV OG ÚTBÚNAÐUR

Fast innbúgv, sum er nevnt í byggiskránni, skal vera partur av tilboði frá heildarráðgevanum. Nevnt innbúgv skal vera úr haldgóðari góðsku. Leyst innbúgv og útgerð skulu ikki roknast upp í tilboðið, men uppskot til innrætting og møpleringsplanur skal gerast og latast inn saman við tilboðnum.

Niðanfyri er víst yvirlit yvir fast og leyst innbúgv umframt útgerð.
Innbúgv víst við spjaldrastøvum er at skilja sum leyst innbúgv og útgerð.
Innbúgv víst við vanligari skrift er at skilja sum fast innbúgv.

Skrivstovur á 17 m²
SKRIVIBORÐ 80 X 160 CM
SKRIVSTOVUSTÓLUR
REOLVEGGUR UML. 40 X 140 CM
FUNDARBORÐ V/6 STÓLUM

Skrivstovur á 10 m²
SKRIVIBORÐ 80 X 160 CM
SKRIVSTOVUSTÓLUR
REOLVEGGUR UML. 40 X 140 CM
KAFÉ-BORÐ Ø80 V/4 STÓLUM

Skrivstovur á 17 m² (sum samstundis er móttøka)
2 STK SKRIVIBORÐ 80 X 160 CM
2 STK SKRIVSTOVUSTÓLUR
REOLVEGGUR UML. 40 X 140 CM
DISKUR, IÐ EIN TELDA STENDUR Á TIL TAKS HJÁ VIÐSKIFTAFÓLKI.
SKELTI "MÒTTØKA" – HXL = 50X100 CM.

Printrúm
2 STK KOPIMASKINUR BXLXH = 60X80X80 CM
HILLAR TIL PAPPÍRSGOYMSLU OG SKRIVSTOVUVØRU. BXL= 35 X 200 CM (FLEIRI HILLAR Í HÆDD)

Fundarrúm á 12 m²
BORÐ OG STÓLAR TIL 6 FÓLK
SKERM Á VEGGI – UML. 65"
VEGGHONGDAN REOLVEGG UNDIR SKERMI, BXLXH = 40X120X60 CM.

Skjalasavn
HILLASKIPAN TIL SKJØL
HILLASKIPAN Á SKINNARUM TIL SKJØL

Vesir
Fult útgjørd vesir við øllum vanligum hentleikum.

Umframt hetta skal vera spegl, vesirulluhaldarar, pappírshaldarar, hygiejne-posahaldarar, knakar til handklæðir og ruskspann.

Fundarhøli á 35 m2
FUNDARBORÐ TIL 25 FÓLK
FUNDARSTÓLAR TIL 25 FÓLK
SKERM Á VEGGI – UML. 98" ELEKTRONISKT WHITEBOARD VIÐ SJÓNMYNDATÓLI, HÁTALARAR
VEGGHONGDAN REOLVEGG UNDIR SKERMI, BXLXH = 40X120X60 CM.

Matarhøli og køkur
Køkseindir og borðpláta sum lýst í pkt. 4.2.8
Hvítvørur sum lýst í pkt. 4.2.8
Køksvask, køkskrani v/tilhoyri, sum lýst í pkt. 4.2.8 og HVS
Eymhetta, sí HVS og VENT
BORÐ OG STÓLAR TIL 25 FÓLK

Skiftirúm
BEINKIR
LOCKERS HXBXD = 1900 X 300 X 400 MM V/ 10 RÚMUM.

Reingerðarrúm
Borðpláta uml. bxl = 600x1500 mm (tillagað rúmið)
Reingerðarvask og reingerðarkrana v/tilhoyri sum lýst í HVS
HVÍTVØRUR
VEGGHONGDAR HILLAR

11. PROSJEKTTILFAR

Sum høvuðsgrundarlag verður víst til: "Ydelsesbeskrivelser, byggeri og planlægning 2012".

- Pkt 2: „Rådgivning i forbindelse med projekteringsledelse"
- Pkt 3: „Rådgivning i forbindelse med projektering"
- pkt 4: „Rådgivning i forbindelse med udførelse"

11.1. Prosjekttilfar at lata inn við tilboðnum

Tekningar og frágreiðingar viðvíkjandi innleggingum, leiðingum umframt øki uttanum, bilstøðlum og uppihaldsøkjum o.a. skulu latast byggiharranum til góðkenningar.

Víst verður til pkt. 3.2.2. í "Ydelsesbeskrivelser, byggeri og planlægning, 2012"

Minstakravið til tilfar er:

- Støðumynd
- Flatmyndir
- Skurðir
- Framsíður
- Frágreiðingar

11.2. Prosjektering og prosjekttilfar

Høvuðsprosjektið og frágreiðingar skulu verða gjørd í samsvari við pkt. 3.3 og 3.4 í "Ydelsesbeskrivelser 2012, byggeri og planlægning"

11.3. Krøv til prosjektorganisatión tilboðsgevarans

Krøv til prosjektorganisatión tilboðsgevarans, herundir upplýsingar um prosjektleiðslu, prosjekteringsleiðslu, entreprisuleiðarar o.s.fr.

1. Tilboðsgevarin skal hava neyðuga fakliga og fíggjarliga vitan í síni umsiting at røkja arbeiðið í sambandi við fyrireiking og útinning.
2. Undirveitarar skulu lúka sama krav sum tilboðsgevari.
3. Tilboðsgevarin skal lýsa, hvør hevur ábyrgdina av:
    - Prosjekt- og prosjekteringsleiðslu
    - Byggileiðslu
    - Fakeftirliti fyri hvørt fak
    - Góðskustýring
    - Fíggjarstýring
    - Heilsu, trygd og umhvørvi

11.4. Gransking og góðskutrygging

Ein góð gransking av eini verkætlan er ein fortreyt fyri einum góðum úrsliti. Gransking skal verða framd, meðan prosjekteringin er ávegis. Somuleiðis skal granskingin fylgja byggingini og veiting av byggieindum.

Gransking fevnir um innanhýsis gransking og tvørfakliga gransking. Byggiharrin setur uttanhýsis gransking á verkætlanina - sí tíðarætlan. Alt framleitt tilfar skal veitast byggiharra og uttanhýsis granskarum í uppruna forritum so sum Revit, Word e.l. fyri hvørt granskingarstig. Hetta er galdandi fyri byggiharra, byggiharraráðgeva og allar teir prosjekterandi partarnar fyri øll fak.

Minstamark fyri ráðgevaragransking eru ásetingarnar í "Ydelsesbeskrivelser 2012 – For Byggeri og Planlægning" kap. 3.
Fyri hvørt stig í prosjekteringini skal gransking fremjast og frágreiðing latast byggiharranum. Farast skal ikki undir næsta stig, fyrr enn góðkenning av undanfarna stigi fyriliggur frá byggiharra, og viðmerkingar eru settar inn í undanfarna stig.

Hartil hevur arbeiðstakarin skyldu til at góðskutryggja arbeiðið og gera eina ætlan fyri góðskustýring, sum í minsta lagi inniheldur:

- Ætlan fyri egið eftirlit, sum sigur frá, hvussu hann tryggjar, at góðskukrøvini verða rokkin fyri øll arbeiðini, og hvussu eftirlitið verður framt og skrásett, herundir tær eftirlitstalvur, sum nýtast skulu.
- Lýsing av, hvussu arbeiðstøkan verður fyriskipað, herundir hvussu umsiting og leiðsla virka, hvørjar útbúgvingar og førleikar tær hava, og hvussu ábyrgd og rættur til at gera avtalur vegna arbeiðstakaran eru býttar millum tey fólk, sum mynda umsitingina og leiðsluna av arbeiðinum.
- Ætlan fyri egið eftirlit skal vera tøk í góðari tíð, áðrenn viðkomandi arbeiði byrjar.
- Ætlanin um, hvussu arbeiðið skal fyriskipast, skal góðkennast av byggiharranum, áðrenn arbeiðið byrjar.

Byggiharrin skilar sær rætt til at seta uttanveltað fakeftirlit at fylgja arbeiðinum – eitt byggiharraeftirlit. Uttanveltaða fakeftirlitið skal hava fría atgongd til øll skjøl viðvíkjandi tilfarsvali og fremjan av arbeiðinum bæði á byggiplássinum og á øðrum staði sum t.d. hjá veitarum, undirarbeiðstakarum o.ø.

11.5. Tíðarætlan

Nágreinilig tíðarætlan skal gerast av arbeiðstakara í sambandi við sáttmálasamráðingarnar.

Heildararbeiðstakarin skal leggja upp fyri undir prosjekteringstíðskeiðinum, at byggiharrin leypandi sleppur at gera smærri prosjektbroytingar uttan eykakostnað.

11.5.1. Tíðarætlan

Tíðarætlanin er galdandi fyri tilboð, liðugtprosjektering, byggiarbeiði umframt byggileiðslu, eftirlit og uppfylging. Hjálagda útboðstíðarætlan, sí fylgisskjal 4, er góðtikin, tá tilboð verður latið inn, og bindandi, tá arbeiðstøkusáttmáli er skrivaður.

11.5.2. Ónýtisdagar (spilldagar) í tíðarætlanina

Tøl niðanfyri av ónýtisdøgum skulu vera íroknað í tíðarætlanina í mun til byggingina:

- Januar ársfjórðingur 15 arbeiðsdagar
- Apríl ársfjórðingur 8 arbeiðsdagar
- Juli ársfjórðingur 0 arbeiðsdagar
- Oktober ársfjórðingur 10 arbeiðsdagar

11.5.3. Krøv til gjaldstreytir/gjaldsætlan

Umbønir heildararbeiðstakarans skulu taka støði í framgongdini í arbeiðinum.

Goldið verður ikki frammmanunan tilfari er veitt á plássinum jbr. §22, stk. 1 og 2 í ABT93.

Rokningar fyri avtalað eykaarbeiði skulu og kunnu ikki goymast til endauppgerðina fyri byggingina jbr. ABT93, §22, stk. 7 og 8, men skulu sendast Landsverki beinanvegin, eykaarbeiði er gjørt og góðkent av eftirlitinum. Freistin fyri innlating av rokning fyri eykaarbeiði er 35 arbeiðsdagar eftir, at arbeiði er gjørt og góðkent av eftirlitinum. Rokningar fyri avtalað eykaarbeiði skulu sendast Landsverki á serskildum rokningum og ikki sum partur av rokningum sambært avtalaðu gjaldsætlanini.

Gjaldsætlan skal gerast, sum er deild sundur á mánaðir jbr. ABT93, §22, stk. 4. Gjaldsætlanin skal taka støði í tíðarætlanini fyri prosjekteringina og byggingina.

Ynski um útgjald skal sendast til Byggiharran sum E-fakturering talgilt. EAN nr. 5797100000034, málsnavn og nummar hjá Landsverki, sáttmálanummar og navn á verkætlanarleiðari skal skrivast á fakturan. Fakturar á ákontoupphædd og avtaluseðlar/eykagjald skal sendast serstakt. Víst verður til www.lv.fo um ákontoupphædd. LEGG TIL MERKIS! Landsverk móttekur bert rokningar í OIOXML format.

Byggiharrin skal ikki gjalda fyri ómaksgjald ella nakað annað gjald í samband við E-fakturering.

Gjaldsfreistin hjá Byggiharra er 30 kalendaradagar eftir móttøka av rætt út flýggjaðum talgildum faktura við teimum kravdu upplýsingunum. Um so er at fakturin er ófullfíggjaður, verður gjaldsfreistin skotin út samsvarandi.

Kopi av faktura skal sendast sum pdf-fíla til verkætlanarleiðaran.

Rokningar kunnu eisini sendast til roknskap@lv.fo. Tað skal viðmerkjast, at eftir 01.01.2018 kunnu rokningarnar bert sendast gjøgnum EAN-nummari.

11.6. Prístalsregulering

Av tí at tilboð arbeiðstakarans eisini fevnir um prosjektering, verður í mesta lagi 85% av tilboðsupphæddini prístalsreguleraø. Prístalsreguleringin fyri tilfar verður gjørd sambært "Byggeomkostningsindekset for boliger ialt" hjá Danmarks Statistik við prístalinum fyri 3. ársfjórðing 2021 sum basisprístal. Lønir verða prístalsreguleraðar eftir vísitalinum fyri føroysku handverkaralønina. Minniveitingar jbr. §14 í ABT93 verða prístalsreguleraðar í sama mun.

Um tilboðsgevarin bjóðar prístalsregulering fyri minni enn 85% av tilboðsupphæddini, skal hetta vera sjónliga upplýst í tilboði hansara.

Umbønir um prístalsregulering skulu verða Landsverki í hendi seinast 14 dagar eftir byrjan av hvørjum ársfjórðingi og skulu vera fyri gjørd og góðkend arbeiðir undanfarna ársfjórðingin. Umbønir um prístalsregulering, sum ikki verða latnar inn rættstundis ella í aðrar mátar ikki eru í lagi, verða ikki góðkendar.

Eykaarbeiðir, sum ikki byggja á eindarprísir í upprunaliga tilboðnum, verða ikki prístalsregulerað. Og eykaarbeiðir, sum byggja á eindarprísir, og sum verða gjørd í sama ársfjórðingi, sum tey eru avtalað, verða heldur ikki prístalsviðgjørd.

Prístalsreguleringar verða útroknaðar eftir danska "byggeindex for boliger" fyri tilfar. Útgangsstøðið verður indexið fyri 1. ársfj. 2021. Indeksi er at finna á leinkju: Byggeomkostningsindeks for boliger - Danmarks Statistik (dst.dk).

11.7. Meir- og minniveitingar

Avtalur um meir- og minniveitingar verða savnaðar á einum "pluss-minus" yvirliti við fullari sáttmálaupphædd fyri einstøku veitingarnar uttan mun til ásetingarnar í ABT93, §14. Nettomunurin verður síðani grundarlag undir endaligu uppgerðini yvir meir- og minniveitingar. Viðvíkjandi avrokning av eykaarbeiðum verður eisini víst til ásetingarnar frammanfyri undir "Krøv til gjaldstreytir/gjaldsætlan".

Heildararbeiðstakarin kann ikki reisa krøv um gjald fyri eykaarbeiðir, sum skrivlig avtala ikki er gjørd um, áðrenn arbeiðið er sett í verk.

11.8. Dagbøtur fyri prosjektering

Í sambandi við tilboðsgevanina skal tilboðsgevarin eisini lata eina sundurgreinað prosjekteringstíðarætlan við í sínum tilboði, ið neyvt lýsir prosjekteringina av byggingini, herundir í minsta lagi fak og prosjekteringsstig, prosjekt-gransking, myndugleikaviðgerð hjá teimum einstøku myndugleikunum, sum skulu geva góðkenningar og loyvir, og aðrar veitingar í sambandi við prosjektering. Somuleiðis skal prosjekteringstíðarætlanin vísa "kritisku linjuna" og "milestones" í sambandi við prosjekteringina.

Tað er ábyrgd heildararbeiðstakarans at tryggja, at neyðug tíð er sett av til myndugleikaviðgerð. Frávik í hesum sambandi geva ikki rætt til at leingja tíðarfreistina jbr. ABT93, §3, stk. 5 og §24, stk. 1, nr. 6

Dagbót á 2‰ (promillur) av tí í tilboðnum upplýsta prosjekteringskostnaðinum verður áløgd fyri seinkingar av prosjekteringini í mun til prosjekteringstíðarætlanina. Dagbót verður útloyst tann. 07-10-2021 Tilboðsgevarin hevur alla ábyrgd av, at prosjekttilfar, ið verður latið myndugleikum til góðkenningar, er fullfíggjað og nøktandi í mun til tey krøv og tey viðurskifti, sum avvarðandi myndugleiki skal viðgera, og at øll loyvir og góðkenningar eru fingin til vega sambært tíðarætlanini.

11.9. Dagbøtur fyri byggiarbeiðið

Saman við tilboðnum skal latast ein neyvt sundurgreinað byggitíðarætlan inn, sum í minsta lagi lýsir byggiplássinnrætting, tilrigging, fakarbeiðstøkur, avrigging og aðrar veitingar í sambandi við byggingina. Somuleiðis skal byggitíðarætlanin vísa "kritisku linjuna" og "milestones" í sambandi við prosjekteringstíðarætlanina og byggingina.

Dagbót á 2‰ (promillur) av tí í tilboðnum upplýsta byggikostnaðinum verður áløgd fyri seinkingar av byggingini í mun til byggitíðarætlanina. Dagbót verður útloyst tann. 30-11-2022. Tilboðsgevarin hevur alla ábyrgd av, at prosjekttilfar, ið verður latið myndugleikum til góðkenningar, er fullfíggjað og nøktandi í mun til tey krøv og tey viðurskifti, sum avvarðandi myndugleiki skal viðgerða, soleiðis at øll neyðug loyvi og góðkenningar verða fingin til vega sambært tíðarætlanini.

11.10.ABT93

Galdandi er ABT93 við neyvlýsingum, frávikum og ískoytum.

ABT93, § 1, stk. 7 er ikki galdandi, og verður í staðin ABF06, §1, stk. 7 galdandi, soleiðis at møguligar trætur verða viðgjørdar í føroysku rættarskipanini.

ABT93, §§ 45-47 eru ikki galdandi, og verða í staðin ABF06, § 45-47 galdandi, soleiðis at møguligar trætur verða viðgjørdar í føroysku rættarskipanini.

12. FÍGGJARLIG VIÐURSKIFTI

Heildararbeiðstøkan má í mesta lagið kosta 20 mió. kr. uttan mvg.

13. RAKSTUR OG VIÐLÍKAHALD (ROV)

Endamálið við rakstrar- & viðlíkahaldsætlanini er at tryggja eitt nøktandi viðlíkahald. Viðlíkahaldið skal leggjast til rættis og tillagast rakstrinum av bygninginum annars. Í samljóði við funktiónskrøvini í byggiskránni, skal viðlíkahaldsstøðið vera við til, at røkka dygdar- og haldgóða bygging:

Byggiharri krevur í hesari verkætlan talgilda avhending. Tað er galdandi fyri allar upplýsingar, sum hava beinleiðis ávirkan á framtíðarrakstrarskeiðið. Treytirnar eru galdandi fyri allar arbeiðstakarar í verkætlanini og skal hetta eisini verða lýst týðuligt í arbeiðsfrágreiðingunum

Alment er galdandi, at loysnir skulu veljast við atliti at løttum rakstri og viðlíkahaldi. Somuleiðis verður dentur lagdur á, at bygningslutir samsvara væl hvør við annan, í mun til útsjónd, góðsku og haldføri.

Allir bygningslutir og innleggingar, sum krevja viðlíkahald, skulu vera lætt atkomuligir, og allar loysnir skulu veljast við atliti at rakstri og viðlíkahaldi. Innan tøkni, so sum hiti og ventilatión, har ið javnan er neyðugt við húsavørði til at máta og skifta, skal hetta ikki vera spjatt, men savnað á einum ella tveimum støðum.

Í hesum stykki eru yvirskipað krøv lýst við tí endamáli at halda funktionella og fíggjarliga virðið í bygningi og fríøkjum, herundir byggilist, -tøkni og dygd.

13.1. Prosjektering (ROV)

Bygningurin skal sniðgevast og gerast soleiðis, at rakstur og viðlíkahald av bygninginum verður skynsamt. Val av tilfari skal styðja upp undir skynsaman rakstur og viðlíkahald, umframt at val av tilfari skal tryggja:

- Eitt optimalt inniumhvørvi uttan ampar av innandura flatum, herundir: gólv, veggir, loft v.m. sum fáast í samarbeiði við brúkara og rakstrarskipanina grundað á tær veittu vegleiðingarnar og fyriskipanirnar frá arbeiðstakara.
- Ein tættan og byggitøkniliga rætt útførdan klimaskerm.
- Góðar og tryggar umstøður fyri brúkarar og gestir í bygningi og útiøkjum.
- Vælvirkandi og orkurættar tøkniligar innleggingar.

Allir lutir, ið krevja reingerð, ansing og røkt, skulu vera atkomuligir og skulu verða settir soleiðis, at arbeiðið at reinsa, ansa og røkja lutirnar/skipanirnar er trygt og nøktandi, herundir:

- Luftskiftisrør og rør í síni heild skulu verða sett so, at tað er møguligt at reinsa og røkja rørskipanina.
- Eftirlitslúkur herundir El-, HVS-, Ventilatión-, v.m.
- Talvur og skýggjar fyri El-, HVS-, Ventilatión-, v.m.
- Allir tøkniligir lutir v.m.

13.2. Gransking (ROV)

Valdar loysnir skulu granskast, og verkætlanartilfarið skal góðskutryggjast viðvíkjandi rakstri og viðlíkahaldi á øllum stigum í prosjekteringini.

Gransking skal sum minstamark fevna um:

- Inniumhvørvi
- Fólkatrygd
- Reingerð
- Viðlíkahald
- Rakstur
- Kostnað av teimum omanfyrinevndu

Góðskutrygging skal sum minstamark innihalda:

- Nøktandi støði á verkætlanartilfari
- Samanstoytsgreining millum fakbólkar
- Greið og fullfíggjað markamót
- Samsvar millum tekningar
- Samsvar millum skjøl
- Tíðarætlan
- Kostnaðarætlan

13.3. Avhending (ROV)

Verkætlanin skal prosjekterast í Revit og hava ráðgevar til uppgávu at lata byggiharranum allar tekningar "sum bygt" av bygninginum eftir nærri avtalu við byggiharran og IKT avtalu. Dentur skal leggjast á, at bygninurin ikki er fullkomuliga liðugur fyrr enn heildararbeiðstakarin hevur handa byggiharranum alt rakstur og viðlíkahaldstilfari og góðskutryggingartilfar.

Harumframt hava ráðgevar og arbeiðstakarar ábyrgdina av, at øll rakstrar-, eftirlits- og vegleiðingarskjøl (REV) verða latin byggiharranum. Hesi skjøl skulu latast gjøgnum tann talgilda pallin sum byggiharrin umsitur og veitir øllum pørtum í verkætlanini atgongd til.

Øll viðkomandi skjøl skulu veitast í forsnið, sum greitt frá í IKT avtalu. Skjøl, sum skulu veitast, eru:

Vegleiðingar fyri REV:

- Upplýsingar um allar byggilutir, elementir og komponentar, sum kunnu vegleiða rakstrarstarvsfólki í gerandisbrúki, eftiransan og viðlíkahaldi.
- Allir byggilutir, elementir og komponentar skulu nágreinast viðv. uppbygnaði og funktión. Eisini skal væntað viðlíkahald, tíðarskeið, brúk og veitari upplýsast.
- Møgulig kunning, upplæring og skeið.

Viðlíkahaldsætlan

- 10 ára viðlíkahaldsætlan skal veitast

Ætlan um rakstrarkostnað

- Skjøl um væntaðan kostnað av rakstri, veiting, orkunýtsla og reingerð
- Meting um rakstrarkostnað skal gerast fyri 10 ára skeið við kostnaðarstøði frá avhendingardegi.

Garantiskjøl

- Allar givnar ábyrgdir/trygdir, herundir einkultvøra og samansettir byggilutir, skulu latast byggiharranum við avhending.

Dátubløð

- Rakstrarviðkomandi vørufrágreiðingar, serliga veitarans vørublað.

Byggilutakort og sermyndir av samanbyggingum

- Veruligar upplýsingar um byggilutir og komponentar og herundir rakstrar- og viðlíkahaldsupplýsingar.

Rúmkort og sermyndir av veggjaframsíðum, gólvum og loftum

- Veruligar upplýsingar um yvriflatur, brúkslutir og innbúgv, armaturir, kontaktir vm. og herundir reingerð, umframt rakstrar og viðlíkahaldsupplýsingar.

Innregulerings-, máti- og royndarfrágreiðingar

- Innregulerings-, máti- og royndarfrágreiðingar, sum eru gjørdar, tá ið farið verður í gongd við verkløg.

"Sum bygt" tekningar og diagramm

- Allar tekningar og diagramm, sum nýtt eru í sambandi við bygging, uppseting og tá ið farið verður í gongd við bygningar og verkløg.
- Avtaluseðlar og skitsur.



LANDSVERK

"Sum bygt" myndir

- Allar myndir frá byggibyrjan til avhending
- Myndir frá eftirlitinum
- Myndir frá arbeiðstakara / veitara
- Myndir frá byggileiðslu